# Upprit

*viðvíkjandi klagu frá frá Árna Skaale, tingmanni, um býti av svartkjaftakvotuni, sum Dennis Holm, landsstýrismaður, ásetti í kunngerð nr. 26 frá 24. apríl 2024 um broyting í kunngerð um at skipa fiskiskapin eftir svartkjafti við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2024 (Dagførdar kvotur og felagskvota).*

Við tilvísing til § 7, stk. 1 í starvsskipan fyri Landsstýrismálanevndina er fyriliggjandi upprit skipað í fylgjandi undirevnið:

1. Frágreiðing um tær faktisku umstøðurnar í málinum
2. Frágreiðing um lóggávuna á økinum
3. Samanburður millum lóggávu og faktiskar umstøðurnar
4. Fyribilsniðurstøða í spurninginum um, hvørt undirritaða heldur, at Dennis Holm landsstýrismaður hevur framt brot á almenna rættarliga lóggávu.

## Frágreiðing um tær faktisku umstøðurnar í málinum

Kunngerð nr. 180 um at skipa fiskiskapin eftir svartkjafti við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2024, dagfest og undirritað tann 22. desember 2023, av landsstýrismanninum í Fiskivinnu- og samferðslumálum, Dennis Holm, varð kunngjørd tann 23. desember 2023 at koma í gildi tann 1. januar 2024.

Kunngerð nr. 26 um broyting í kunngerð um at skipa fiskiskapin eftir svartkjafti við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2024 (Dagførdar kvotur og felagskvota), dagfest og undirritað tann 24. apríl 2024, av landsstýrismanninum í Fiskivinnu- og samferðslumálum, Dennis Holm, varð kunngjørd tann 24. apríl 2024 at koma í gildi dagin eftir kunngerð.

Umframt dagføring av kvotum varð ein nýggj § 8 a sett inn í kunngerðina, ið er soljóðandi:

*"§ 8 a. Í 2024 verða 35.000 tons av svartkjafti latin sum felagskvota við hámarki til eigarar av fiskiførum undir føroyskum flaggi, sum við fiskiársbyrjan í 2024 hava rætt at fiska svartkjaft. Hámarkið hjá hvørjum fiskifari er 2.500 tons. Fiskiskapurin kann fara fram í føroyskum sjógvi, íslendskum sjógvi og í NEAFC-skipanarøkinum.*
*Stk. 2. Fiskifør, sum bara hava tillutaða kvotu, latin til vinnuligar royndir og verkætlanir á landi sambært § 4 í kunngerð um kvotur av makreli, norðhavssild og svartkjafti til vinnuligar royndir og verkætlanir, fáa ikki lut í kvotuni sambært stk. 1.*
*Stk. 3. Fyri at fáa fiskiloyvi sambært stk. 1, skal egin árskvota, tillutað í 2024 sambært § 4 ella kvota av nøgdunum í §§ 6-8 vera fiskað, samanber tó stk. 2. Somuleiðis skal flutt restkvota frá 2023 til 2024 og avhend kvota í 2024 vera fiskað.*

*Stk. 4. Eru líkindi fyri, at kvotan í stk. 1 ikki verður fullnýtt, kann landsstýrismaðurin broyta ella taka burtur hámarkið."*

Skjølini, sum Landsstýrismálanevndin hevur fingið frá Dennis Holm, Landsstýrismanni, saman við hansara frágreiðing um málið, dagfest 1. juli 2024, lýsa tilgongdina í málinum, áðrenn kunngerðin varð lýst, og viðgerðina av spurninginum um at broyta kunngerðina.

Áðrenn kunngerð nr. 26 í 2024 varð sett í gildi, hevur landsstýrismaðurin við teldubrævið tann 25. mars 2024 fingið sendandi fylgjandi skjøl frá einum ráðgeva á Fiskivinnustovuni í Fiskimálaráðnum:

1. Útkast til upprit at senda við kunngerðini, tá hon fer til almenna hoyring
2. Fyribils innanhýsis upprit viðv. felagskvotu av svartkjafti í 2024

Uppritið at senda við kunngerðini greiðir nærri frá, hvat ætlanin er við kunngerðini.

Fyribils innanhýsis uppritið, ið er dagfest 25. mars 2024, er undir yvirskriftini "*Viðvíkjandi ætlanum um felagskvotu av svartkjafti*" og "*vísir á viðurskifti, ið eru viðkomandi at taka við í viðgerðini av ætlanini*".

Uppritið greiðir innleiðandi frá um "*skipanina higartil*", áðrenn "*avleiðingar av nýggjari felagskvotu og nýggjum býti*" verða lýstir, herundir fyrst "*høvuðstøl*", síðani í mun til "*avleiðingar fyri svartkjaftaskipini*", hereftir í mun til "*samlaðu uppsjóvarkvoturnar hjá teimum søguligu svartkjaftaskipunum*", fyri til seinast at taka samanum undir yvirskriftini "*samlað meting av inntrivinum*". Uppritið endar við einum brotið um "*onnur viðkomandi viðurskifti*", har spurningurin um "*nýtt og økt tilfeingi*" og "*javnseting av aktørunum í uppsjóvarvinnuni*" verður viðgjørdur.

Undir yvirskriftini "*høvuðstøl*" verður m.a. greitt frá, at "*Um ein felagskvota av svartkjafti verður sett í 2024 merkir hetta, at heildarkvotan av svartkjafti verður býtt av nýggjum. Ein nýggj felagskvota broytir mynstrið, sum hevur verið í býtinum av heildarkvotuni árini 2018-2023. Hetta tíðarskeiðið er valt, tí hesi árini hava lógarkarmarnar, sum hava týdning fyri býtið av svartkjaftinum verið mestsum óbroyttir.*" Eisini verður víst á, at "*Avleiðingin av øllum vístu roknidømunum er, at tey søguligu fáa lutfalsliga minni, enn tey annars vildu fingið. Teirra kvotupartur verður minni. Tey fáa ikki lut í allari hækkingini í heildarkvotuni. Allar hinar kvoturnar- og uppboðskvotur og vinnuligar royndir og verkætlanir – varðveita sín lógarásetta part av heildarkvotuni og fáa lut í hækkingini frá 2023 til 2024.*"

Undir yvirskriftini "*Samlað meting av inntrivinum*" verður tikið soleiðis samanum:

"*Ein felagskvota av svartkjafti í 2024, sum verður tikin av heildarkvotuni, ber í sær, at søguligu rættindahavarar fáa minni av svartkjafti í 2024, enn teir annars vildu fingið. Tí er ikki óhugsandi, at onkur fer at føra fram, at talan er um inntriv í søgulig veiðirættindi og kanska um ognartøku.*

*Fyrisitingin hevur umrøtt hendan spurning men metir ikki, at tað er grundarlag nú at gera nærri og ítøkiligar metingar av spurninginum.*

*Ístaðin mugu vit í fyrsta umfari vita, hvussu leikur fer og at taka spurningin upp, tá ein ítøkilig støða fyriliggur.*

*Í hesum umfari eru tað serliga hesi viðurskifti, ið eru viðkomandi:*

- *inntrivið í rættindini hjá svartkjaftaskipunum er í krónum og oyrum ikki so stórt. Í sjálvum sær er sjálvsagt talan um stórar upphæddir. Men um vit samanbera við virði á samlaðu kvotuni hjá svartkjaftaskipunum ella við samlaða virði á uppsjóvarkvotunum, svartkjaftaskipini væntandi koma at hava í 2024, er inntrivið ikki so stórt.*
- *samlaða kvotan at býta millum søguligu svartkjaftaskipini í 2024 er ikki minni enn í 2023.*
- *Øll, sum hava svartkjaftarættindi í 2024, fáa lut í felagskvotuni treytað av, at tey hava fiskað sínar egin kvotur.*
- *Hóast tað beint nú kann vera ringt at vísa á ítøkiligar og neyvar grundgevingar fyri broytingini, so metir fyrisitingin, at í skipanini eigur generelt at vera møguleiki at býta av nýggjum, eitt nú sum ein liður í politiskum fordeilingsynskjum, og tá tað verður mett fyrisitingarliga forsvarligt.*

*Dentur er lagdur á, at felagskvotan bara verður í 2024, og fær sum so ikki týdning frameftir.*"

Spurningurin um inntriv í søgulig veiðurættindi og um ognartøku er sostatt ikki viðgjørdur nærri í hesum uppritinum. Spurningurin um lógarheimildina fyri kunngerðini er heldur ikki tikin upp ella umrøddur í uppritinum.

Tey hoyringsskriv, sum koma inn á spurningin um inntriv í søgulig veiðurættindi, ognartøku og/ella lógarheimildina fyri kunngerðini, er fylgjandi:

Føroya Reiðarafelag, dagfest 9. apríl 2024, har spurningurin verður reistur, "*um landsstýrismaðurin hevur løgfrøðiliga heimild til at broyta býtið av kvotunum í eini kunngerð, uttan at broyta lógina*". Sum grundgeving verður víst til § 16 í lógini um sjófeingi og til viðmerkingarnar til hesa lógargreinina.

Felagið Nótaskip, dagfest 8. apríl 2024, har spurningurin eisini verður reistur, um "*landsstýrismaðurin hevur heimild til í kunngerð at fremja hesa broyting*". Gjørt verður galdandi, at "*hon má gerast í lóg við at broyta Sjófeingislógina*".

Felagið Nótaskip vísir eisini á, at "*Í 2018 vórðu 34% av svartkjaftakvotuni tikin frá søguligu rættindahavarunum, sum eru skipini í Felagnum Nótaskip og Felagnum*

*Ídnaðarskip, men tá vórðu loyvini gingin út, eftir at tey vórðu søgd upp í 2008. Nú eru vit mitt í eini loyvistíð, og tí er støðan ein heilt onnur."*

Við hoyringsskrivinum hjá Felagnum Nótaskip er eitt skriv frá Niels W. Poulsen, adv., sum er biðin um at gera eina løgfrøðiliga meting av málinum, har hann kemur til fylgjandi niðurstøðu: "*Niðurstøðan er sostatt, at tá býtið av svartkjaftakvotuni er so neyvt definerað í sjófeingislógini, meti eg ikki, at fiskimálaráðharrin hevur heimild í kunngerð at broyta hetta býtið, sum verður avleiðingin av ásetingini um felagskvotu."* Eisini hann vísir í sínum grundgevingum til § 16 í lógini um sjófeingi og til viðmerkingarnar til hesa lógargreinina.

Felagið Nótaskip vísir harumframt á, at "*verður ætlaða broytingin framd, so brýtur Fiskimálaráðið avtaluna, sum í 2009 varð gjørd um býtið av svartkjaftinum."* Felagið Nótaskip greiðir í hesum sambandi frá, at "*Í 2005 samdust strandalondini um eitt býti av svartkjaftastovninum, sum fekk gildi í 2006. Eftir drúgvar samráðingar varð í 2009 avtala gjørd millum Fiskimálaráðið og uppsjóvarskipini í Felagnum Nótaskip og í Felagnum Ídnaðarskip um býti av føroysku kvotuni."*

Millum skjølini, sum Landsstýrismálanevndin hevur fingið frá Dennis Holm, Landsstýrismanni, saman við hansara frágreiðing um málið, dagfest 1. juli 2024, er harumframt eitt innanhýsis arbeiðsskjal, dagfest 29. apríl 2024, "*Viðvíkjandi ætlanum um at útluta ein part av heildarkvotuni av svartkjafti í 2024 sum felagskvotu*".

Tað er ikki upplýst, um ella nær landsstýrismaðurin er kunnaður um innihaldið í hesum innanhýsis arbeiðsskjalinum, og hví ella eftir áheitan frá hvørjum hetta er framleitt.

Tað er tó greitt, at skjalið er dagfest eftir at kunngerðin er lýst. At yvirskriftin vísir til ætlanir og ikki eina framda útlutan at felagskvotu, kann tó geva ábending um, at skjalið kann verða framleitt, áðrenn kunngerðin er lýst.

Inngangurin til innanhýsis arbeiðsskjalið er soljóðandi:

"*Fyrisitingin er biðin um at gera uppskot til broytingar í svartkjaftakunngerðini í sambandi við politiska ætlan um, at ein partur av føroysku svartkjaftakvotuni í 2024 skal latast skipum sum felagskvota við hámarki.*

*Talan er um eitt prinsipielt mál.*

*Í stuttum merkir ætlanin, at heildarkvotan av svartkjafti verður býtt øðrvísi í 2024 enn frammanundan. Ein nýggj felagskvota verður roknað av heildarkvotuni, og tað ger, at kvotuluturin hjá teimum søguligu aktørunum verður minni, enn hann annars vildi verið. Í sjófeingislógini er ásett, hvussu nógv prosent av heildarkvotuni skulu setast av til vinnuligar royndir og verkætlanir og til uppboðskvotur. Tað, ið er eftir, tá tað lógarásetta er drigið frá, hevur verið latið søguligu aktørunum. Kvotuluturin hjá teimum*

*søguligu er tó ikki greitt ásettur í lógini. Men ein nýggj felagskvota í 2024 ger, at minni er at býta millum søguligu aktørarnir.*

*Hetta arbeiðsskjalið vísir á viðurskifti, ið eru viðkomandi at taka við í viðgerðini av ætlanini.*

*Fyrst er skipanin í fiskiskapinum eftir svartkjafti higartil lýst. Lógarheimildin fyri ætlaðu umfordeilingina í 2024 og lógargrundarlagið er lýst.*

*Grundleggjandi spurningarnir í øllum eru um grundgevingarnar fyri broytingini eru sakligar, og um søguligu aktørarnir í lóg ella grundað á siðvenju kunnu sigast at hava ein rætt til ein ávísan part av heidarkvotuni av svartkjafti.*

*Harumframt vísir arbeiðsskjalið á onnur viðkomandi viðurskifti í málinum. Aftast í arbeiðsskjalinum eru avleiðingarnar av ætlaðu broytingini lýstar í tølum."*

Undir yvirskriftini "*Heimildin og lógargrundarlagið*" verður víst til § 22, stk. 1 og § 23, stk. 1 og 2 í sjófeingislógini, har viðmerkt verður, at talan í høvuðsheitum er um "*somu heimildir, ið vóru í undanfarnu sjófeingislóg og í lógini um vinnuligan fiskiskap."*

Síðani verður viðmerkt, at:

"*Heimildin at skipa fiskiskapin er breið, og mett verður, at ein broyting í býtinum av svartkjaftinum í 2024 er innan fyri heimildina.*

*Í hesum sambandi skal vera víst á, at heimildin, sum í høvuðsheitum er óbroytt í lógarverkinum seinastu nógvu árini, áður hevur verið brúkt, tá partur av svartkjaftinum er settur av til felagskvotu. Bæði í 2015 og 2017 (nota 1: kunngerð 138/2014 og kunngerð 137/2016) var ein lutfalsliga stórur partur av føroysku svartkjaftakvotuni útlutaður skipum sum felagskvota, sum øll skip við veiðiloyvi kundu fiska av.*

*Tað hevur eisini týdning at nevna, at parturin til teir søguligu aktørarnir er ikki greitt ásettur í galdandi lóg, og heldur ikki býtið millum søguligu aktørarnir, og at teir tí kunnu ikki metast at hava ein lógartryggjaðan rætt til ein ávísan part av heildarkvotuni.*

*Eisini er vert at nevna, at í viðgerðini av ætlanini um at lata ein part av svartkjaftakvotuni sum felagskvotu, hevur verið umrøtt um ein við at vísa til viðmerkingarnar til grein 16 í sjófeingislógini kann siga, at svartkjaftabýtið er neyvt definerað í lógini, og at landsstýrismaðurin tí ikki hevur heimild til í kunngerð at broyta hetta býtið. Her er at viðmerkja, at ásetingarnar í grein 16 í lógini einans snúgva seg um, hvussu kvotan sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir flytur seg við broytingum í tøku føroysku kvotuni og heildarkvotuni. Mett verður ikki, at aðrar kvotur við støði í hesi lógargrein kunnu siga seg hava ein lógartryggjaðan rætt, hóast ein í viðmerkingunum við roknidømum hevur roynt at lýsa, hvussu kvotur flyta seg við broytingum í tøku kvotuni og heildarkvotuni."*

Undir yvirskriftini "*grundgevingar fyri broytingini?*" verður upplýst, at "*Høvuðsgrund-gevingin fyri broytingini er eitt politiskt ynski um at umfordeila ein part av svartkjafta-kvotuni í 2024.*" Í hesum sambandi verður viðmerkt, at "*Umfordeiling er ikki eitt beinleiðis ósakligt grundarlag, men tað er ikki ein nøktandi grundgeving í sjálvum sær og eigur at vera viðgjørt nágreiniligari og í breiðari høpi.*"

Víðari stendur skrivað, at:

"*Ynski um umfordeiling hevur í hesum føri ført til viðgerð í fyrisitingini av grund-leggjandi spurningum ísv. býtið. Yvirskipað snýr tað seg um at fordeila úrtøkuna av tilfeinginum, herundir um tað er rætt og rímiligt at halda fast við saman býtið, óansæð støddina av kvotuni.*

*Við støði í teimum atlitum, sum eru grundarlag undir fiskivinnulóggávuni og umsitingini av økinum sum heild, kann t.d. vera grundarlag fyri at umfordeila, tá kvotan verður størri enn eitt ávíst. Yvirskipað snýr tað seg um at fordeila úttøkuna av livandi tilfeinginum. Hetta var eisini grundgeving, tá felagskvota varð sett í 2017, nevniliga, at ynskiligt var at gera fiskiskapin atkomuligan hjá øllum.*"

Undir yvirskriftini "*hava søguligu aktørarnir rætt til ein ávísan lut í heildarkvotuni?*" verður spurningurin tikin upp, um "*søguligu aktørarnir sambært siðvenju kunnu sigast at hava rætt til ein ávísan part av kvotuni*", men aftur her verður víst á, at "*Bæði í 2015 og 2017 var ein lutfalsliga stórur partur av føroysku svartkjaftakvotuni útlutaður skipum sum felagskvota, tvs. at alt, sum var tøkt hjá føroyskum skipum at fiska, ikki varð latið søguligu aktørunum sum egnar árskvotur.*" Lagt verður afturat, at "*Tey árini var ein lutfalsliga størri partur av føroysku kvotuni settur av til felagskvotu, enn ætlanin leggur upp til. (nota 3: Í 2025 var føroyska kvotan 425.000 tons og 120.000 tons (28%) vóru sett av til felagskvotu, sum øll við veiðiloyvi kundu fiska av. Í 2017 var føroyska kvotan 476901 tons og 70.000 tons (15%) fóru til felagskvotu, sum øll við veiðiloyvi kundu fiska av. Til samanbering er ætlanin í 2024 at seta 35.000 í felagskvotu, sum er góð 6% av føroysku kvotuni.)*" Spurningurin verður í seinasta brotið svaraður soleiðis: "*Samanumtikið verður mett, at tað illa ber til at vísa til greiða siðvenju á økinum, og at tað tí er mest sum talar fyri, at søguligu aktørarnir ikki hava ein rætt sambært siðvenju til ein ávísan part av heildarkvotuni.*"

Undir yvirskriftini "*Ognartøka?*" verður innleiðandi greitt frá um tey atlit, sum eru viðkomandi at meta um, tá støða skal takast til spurningin, um talan er um eitt inntriv av ekspropriativum slagi í søgulig rættindi. Spurningurin verður í seinasta brotið svaraður soleiðis: "*Sum longu er víst á, er við støði í teimum atlitum, sum eru grundarlag undir fiskivinnulóggávuni og umsitingin av økinum sum heild, kann tað vera sakligt og at grundarlag tí er fyri at umfordeila, eitt nú tá kvotan verður størri enn eitt ávíst. Men tann spurningurin eigur at vera nærri viðgjørdur við atliti at býtinum og útlutingini av veiðirættindum í síni heild.*"

Eisini hetta uppritið endar við einum brotið um "*onnur viðkomandi viðurskifti – politiskar ætlanir frameftir*", har spurningurin um "*nýtt og økt tilfeingi*" og "*javnseting av aktørunum í uppsjóvarvinnuni*" verður viðgjørdur.

Umframt skjølini, sum Landsstýrismálanevndin hevur fingið frá Dennis Holm, Landsstýrismanni, saman við hansara frágreiðing um málið, dagfest 1. juli 2024, eru eisini onnur viðurskifti, ið kunnu hava týdning við atliti til at lýsa tilgongdin í málinum, áðrenn kunngerðin varð lýst.

Samsvarandi § 7, stk. 4 í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi hevur landsstýrismaðurin lagt fram frágreiðing fyri Løgtingið sambært § 51, stk. 4 í Tingskipan Løgtingsins um fyrisiting av sjófeingi og teimum veiðirættindum, Føroyar hava uttan fyri føroyskan sjógv, og hvørjar ætlanir hann hevur í hyggju at fremja.

Frágreiðingin og framløguskrivið eru dagfest tann 19. februar 2024, men sambært heimasíðuni hjá løgtinginum, varð frágreiðingin ikki løgd fram fyrr enn tann 11. apríl 2024, og aðalorðaskifti var ikki fyrr enn tann 18. apríl 2024.

Undir pkt. 7 í hesi frágreiðing og undir yvirskriftini "*Rættindahavarar í uppsjóvarvinnuni javnsetast*" greiðir landsstýrismaðurin soleiðis frá, um hvørjar ætlanir hann hevur í hyggju at fremja:

"*Í verandi skipan hava árligu nøgdirnar av makreli, svartkjafti og norðhavssild at býta millum rættindahavarar ymiskan uppruna. Vit hava egnar kvotur, ið stava frá nøgdum, sum upprunaliga eru settar av til menningarkvotur ella til vinnuligar royndir og verkætlanir. Vit hava egin rættindi, sum eru keypt á uppboði í 2018 og í 2019. Og vit hava egnar kvotur, sum verða latnar søguligu rættindahavarunum.*

*Eftir sjófeingislógini verða árligu nøgdirnar av makreli, svartkjafti og norðhavssild ikki ásettar eftir somu grundreglum.*

*Samgongan hevur sett sær fyri, at aktørarnir í uppsjóvarvinnuni skulu javnsetast, tá føroysku kvoturnar lækka ella hækka.*

*Tí er farið undir at fyrireika lógarbroytingar, soleiðis at allir rættindahavarar í uppsjóvarvinnuni eru javnsettir og undir somu treytum í lógini. Ætlaðu broytingarnar stuðla samstundis undir, at skipanin við útluting av uppsjóvarkvotum verður einfaldari, gjøgnumskygdari og lættari at umsita.*"

Frágreiðingin nevnir ikki ætlanir um, at ein partur av føroysku svartkjaftakvotuni í 2024 skal latast skipum sum felagskvota við hámarki.

## Frágreiðing um lóggávuna á økinum

Viðkomandi ásetingar í sjófeingislógini - løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 155 frá 20. desember 2023 – sum hava týdning fyri spurningin um heimildirnar hjá landsstýrismanninum, tá tað kemur til býti av svartkjaftakvotu, eru fyrst og fremst §§ 22, stk. 1 og 23, stk. 1 og 2, sum tilskila, hvørjar heimildir landsstýrismaðurin hevur at "*áseta kvotuskipan, fiskidagaskipan ella aðra skipan og áseta nærri reglur um býti av tøkum fiskimøguleikum*" har § 22 snýr seg um fiskiskap í føroyskum sjógvi, tó undantikið fiskiskap skipaður sambært § 18 um fiskidagar, og § 23 snýr seg um fiskiskap uttanfyri føroyskan sjógv.

§ 22, stk. 1 er soljóðandi:
"*Fyri fiskiskap í føroyskum sjógvi, undantikin fiskiskapur skipaður sambært § 18, samanber tó stk. 4, kann landsstýrismaðurin áseta kvotuskipan, fiskidagaskipan ella aðra skipan og nærri reglur um atgongd, býti av tøkum fiskimøguleikum millum bólkar av fiskiførum, einstøk fiskifør og veiðihættir, og hvussu fiskiskapurin skal fara fram.*"

§ 23, stk. 1 og 2 eru soljóðandi:
"*Fiskiskapur hjá føroyskum fiskiførum, uttan fyri føroyskan sjógv, verður skipaður samsvarandi sínámillum fiskiveiðiavtalum, samtyktum í økisbundnum fiskiveiðifelags-skapum og eftir millumlanda avtalum. Eru Føroyar ikki partar av avtalu ella samtykt, ella eingin samtykt er um fiskiskap í altjóða sjógvi, ásetir landsstýrismaðurin kvotur, fiskidagar ella aðra skipan.*
*Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um býti av tøkum fiskimøguleikum, ið ikki eru bodnir út á uppboði, og hvussu fiskiskapurin skal fara fram.*"

Býti av uppsjóvarfiski, í hesum føri svartkjafti, kann sostatt verða ásett antin eftir § 22 ella § 23, ella báðum hesum ásetingum. Munurin millum ásetingarnar er, at § 22 nevnir at talan er um býti "*millum bólkar av fiskiførum, einstøk fiskifør og veiðihættir*", meðan § 23 bert nevnir at talan er um býta av tøkum fiskimøguleikum, "*ið ikki eru bodnir út á uppboðssølu*".

Viðmerkingarnar til § 22, stk. 1 eru soljóðandi:
"*Stk. 1. Her er ásett, at landsstýrismaðurin kann gera nærri reglur fyri fiskiskapi, ið er eftir fiskasløgum og djórasløgum, ið ikki eru fevnd av fiskidagaskipanini, ella sum vanliga ikki eru høvuðsfiskasløg hjá teimum skipum og bátum, ið fiska undir fiskidagaskipanini –toskur, hýsa og upsi. Her kann vera talan um fiskiskap eftir øðrum botnfiski, uppsjóvarfiski ella øðrum djórasløgum, so sum skeljar, hummari, krabbi o.a.*

*Ásetingin gevur landsstýrismanninum heimild at áseta heildarkvotu, reglur um atgongd, býti av heildarkvotum millum bólkar av fiskiførum, einstøk fiskifør, veiðihættir, og hvussu fiskiskapurin annars skal fara fram. Harumframt kann talan vera um reglur, sum avmarka talið av fiskiloyvum og reglur um loyvdar fiskileiðir, reiðskap og hjáveiðireglur.*

*Talan er í høvuðsheitum um somu heimildir, ið landsstýrismaðurin hevur í verandi sjófeingislóg."*

Løgtingið gjørdi í 2007 av at broyta tað tá galdandi lógina um vinnuligan fiskiskap, so at einki veiðiloyvi og fiskiloyvi hevði gildi longri enn til 1. januar 2018.

Lógin um fyrisiting av sjófeingi, ið kom í gildi 1. januar 2018, ásetti nýggja gildistíð og nýggjar lógarkarmar fyri hesi veiðurættindi.

Í gildistíðarskeiðinum kunnu ásetingarnar, sum vóru settar í gildi tann 1. januar 2018, tí eisini hava týdning fyri tulkingina av galdandi sjófeingislóg.

§ 22, stk. 1 svarar stórt sæð til ásetingina í § 28, stk. 1 í løgtingslóg nr. 161 frá 18. desember 2017 um fyrisiting av sjófeingi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 126 frá 5. august 2019.

Viðmerkingarnar til § 28, stk. 1 í lógini um fyrisiting av sjófeingi, sum varð sett úr gildi við galdandi sjófeingislóg, eru soljóðandi:
*"Stk. 1. Henda grein, ið fær virkna við gildiskomu lógarinnar, ásetir, at landsstýris-maðurin við kunngerð kann seta reglur fyri fiskiskapi, ið er eftir fiskasløgum og djórasløgum, ið ikki eru fevnd av kvotuskipanini ella fiskidagaskipanini, sum eftir uppskotinum verða sett í gildi í 2019, ella fiskidagaskipanini í 2018 (sambært greinunum 73-80 í hesum uppskotinum). Her er talan um fiskiskap eftir botnfiski, uppsjóvarfiski og øðrum djórasløgum, sum skeljar, hummara, krabba o.a.*

*Ásetingin gevur landsstýrismanninum heimild at áseta heildarkvotu og reglur um atgongd, býti av heildarkvotum millum bólkar av fiskiførum, einstøk fiskifør og veiðihættir, og hvussu fiskiskapurin annars skal fara fram. Harumframt kann talan vera um reglur, sum avmarka talið av fiskiloyvum og reglur um loyvdar fiskileiðir, reiðskap og hjáveiðireglur.*

*Talan er í høvuðsheitum um somu heimildir, ið landsstýrismaðurin hevði sambært lógini um vinnuligan fiskiskap."*

Viðmerkingarnar til § 23, stk. 1 í galdandi lóg innihalda ikki vegleiðing av týdningi fyri fyriliggjandi mál.

Viðmerkingarnar til § 23, stk. 2 innihalda fylgjandi frágreiðing, sum, umframt vegleiðing um býti, møguliga eisini kann siga okkurt um omanfyrinevnda munin, sum møguliga er, millum tær heimildir, ið landsstýrismaðurin hevur, ávikavist í og uttanfyri føroyskan sjógv, tá tað snýr seg um býti:

*"Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um býtið av tøkum fiskimøgu-leikum, og hvussu fiskiskapurin skal fara fram á leiðum uttan fyri føroyskan sjógv. Við*

*hesum lógaruppskotinum eru umsitingarligu og skipanarligu karmarnir í høvuðsheitum teir somu sum í galdandi lóg.*

*Tá gerast skal av, hvussu rættindi skulu útlutast og býtast millum fiskifør, er søguligur fiskiskapur ofta tað, ið telur mest, t.v.s. at hugt verður at, hvussu fiskiskapurin søguliga hevur verið, hvørji skip hava fiskað, og hvussu nógv tey hava fiskað.*

*Fyritreytirnar kunnu vera ymiskar. Til dømis kann vera talan um at umskipa fiskiskap frá felagskvotu, sum hevur verið í skipanini í nøkur ár, til egnar kvotur. Her er høvuðsfyrilitið oftast "søguligur fiskiskapur", sum er eitt vanligt og góðtikið metingarstøði, tá býtast skal.*

*Í øðrum førum er talan um kvoturættindi, sum eru nýggj, t.e. rættindi, ið ikki áður hava verið tøk hjá føroyskum skipum. Í slíkum førum er støðan vanliga, at einki skip ella skipabólkur kann vísa til meira søgulig rættindi enn nakar annar bólkur."*

§ 23, stk. 1 og 2 svara til ásetingarnar í § 34, stk. 1 og 2 í løgtingslóg nr. 161 frá 18. desember 2017 um fyrisiting av sjófeingi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 126 frá 5. august 2019.

Innleiðandi viðmerkingarnar til § 34 og ítøkiligu viðmerkingarnar til § 34, stk. 1 og 2 í lógini um fyrisiting av sjófeingi, sum vóru settar úr gildi við galdandi sjófeingislóg, eru soljóðandi:

*"Hendan greinin snýr seg um fiskiskap hjá føroyskum skipum uttan fyri føroyskan sjógv. Hon stavar frá lógini um vinnuligan fiskiskap, men er við hesum uppskotinum dagførd og nakað tillagað.*

*Stk. 1. Treytir fyri fiskiskapi í altjóða sjógvi verða sum høvuðsregla ásettar við samtyktum í økisbundnum fiskiveiðifelagsskapum, sum t.d. NEAFC og NAFO. Er eingin samtykt, ella Føroyar ikki eru partur av samtykt, ásetir landsstýrismaðurin treytirnar.*

*Veiðinøgdir og aðrar treytir í fiskiskapi eftir ferðandi fiskastovnum, sum vanliga fer fram í fleiri fiskiveiðiløgdømum, verða ásettar í strandarlandaavtalum ella samtyktum í økisbundnum fiskiveiðifelagsskapum. Er eingin avtala ella samtykt, kann landsstýrismaðurin skipa fiskiskapin eftir ferðandi ella felags fiskastovnum í føroyskum og altjóða sjógvi.*

*Við heimild í stk. 2 kann landsstýrismaðurin við kunngerð gera nærri reglur um býti av tøkum fiskimøguleikum, og hvussu fiskiskapurin skal fara fram á leiðum uttan fyri føroyskan sjógv. Við hesum lógaruppskotinum verður ein partur av føroyskum rættindum uttan fyri føroyskan sjógv seldur á uppboði. Tað mesta av veiðirættindunum aðrastaðni verður tó framvegis latið teimum somu, sum eru í vinnu, tá lógin fær gildi. Fyri fiskiskap av hesum rættindum, ið ikki fara á uppboð, eru umsitingarligu og skipanarligu karmarnir í høvuðsheitum teir somu, sum í gomlu lógini.*

*Tá gerast skal av, hvussu rættindi skulu útlutast og býtast millum fiskifør, er søguligur fiskiskapur ofta tað, ið telur mest, t.v.s., at hugt verður at, hvussu fiskiskapurin søguliga hevur verið, hvørji skip hava fiskað, og hvussu nógv tey hava fiskað.*

*Fyritreytirnar kunnu vera ymiskar. Til dømis kann vera talan um at umskipa fiskiskap frá felagskvotu, sum hevur verið í skipanini í nøkur ár, til egnar kvotur. Her er høvuðsatlitið oftast "søguligur fiskiskapur", sum er eitt vanligt og góðtikið kriterii, tá býtast skal.*

*Í øðrum førum er talan um kvoturættindi, sum eru nýggj, t.e. rættindi, ið ikki áður hava verið tøk hjá føroyskum skipum. Í slíkum førum er støðan vanliga, at einki skip ella skipabólkur kann vísa til meira søgulig rættindi enn nakar annar bólkur. Í hesum lógaruppskotinum er lagt upp til, at slík nýggj rættindi verða lutað út um alment uppboð."*

Allýsing av hugtakinum "*egin kvotupartur*" er at finna í § 2, stk. 1, nr. 17, og er soljóðandi: "*Tann prosentpartur av felags árskvotu, ið persónur ella felag, ella eigari av fiskifari hevur rætt at veiða á ávísari leið*". Hugtakið "*felags kvotupartur*" er allýst í § 17, stk. 1, nr. 15 og er soljóðandi: "*Tann prosentpartur av heildarkvotu av ávísum livandi sjófeingi, ið rættindahavarar ella ein bólkur av fiskiførum undir einum hevur rætti til at veiða*".

Eisini kann vera viðkomandi at nevna § 2, nr. 6, sum er soljóðandi: "*Fiskiloyvi: Tann rættur, sum eigari av ávísum fiskifari fær at veiða av ávísum livandi sjófeingi á ávísum leiðum í einum fiskiári.*" og § 2, nr. 19 sum er soljóðandi: "*Felagskvota við hámarki: Felags árskvota, sum persónur, felag ella eigari av fiskifari hevur rætt at veiða av, tó so, at hámark verður sett fyri, hvussu nógv hvør persónur ella felag ella fiskifar kann veiða.*"

Umframt ásetingarnar í §§ 22, stk. 1 og 23, stk. 1 og 2 hava ásetingarnar í kap. 4, sum eru §§ 14-17, tó eisini týdning, við atliti til spurningin um heimildirnar hjá landsstýrismanninum, tá tað kemur til býti av svartkjaftakvotu.

Kap. 4 snýr seg um hvør partur av tøku føroysku kvotunum av ávikavist svartkjafti, norðhavssild og makreli skulu setast av til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49.

Hesin partur, ið eisini fevnir um menningarkvotur lætnar sambært § 60 í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, og sum hava gildi 1. januar 2020, og egnar árskvotur sambært § 10, stk. 3 ella 49, stk. 4, er sum útgangsstøði ásettur til 8,5% í § 14.

Ásetingin í § 14 er sett inn við einum broytingaruppskoti frá minnilutanum (samgongu-umboðunum) í vinnunevndini, ið varð samtykt eftir 2. viðgerð í løgtinginum tann 19. desember 2019, har eisini yvirskriftin til kap. 4, sum eru §§ 14-17 varð broytt.

Hesi broytingaruppskotini eru soljóðandi:

*"Heitið á kapitli 4 verður orðað soleiðis:*
*"Nøgdir at seta av til vinnuligar royndir og verkætlanir"*

*§ 14 verður orðað soleiðis:*
*"§ 14. Av tøku føroysku kvotunum av ávikavist svartkjafti, norðhavssild og makreli verða 8,5% sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49. Menningarkvotur latnar sambært § 60 í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, og sum hava gildi 1. januar 2020, verða roknaðar av nøgdini sambært 1. pkt. Verður lagt um til egnar árskvotur, sambært § 10, stk. 3, verður mongdin tikin av nøgdini sambært 1. pkt.""*

Yvirskipaðu viðmerkingarnar til kap. 4 í broytingaruppskotinum eru soljóðandi:
*"Lagt verður við hesum broytingum upp til, at ætlaða sølan av rættindum í 2020 verður slept. Ístaðin verður tann nøgd, sum ætlandi skuldi bjóðast út sum ávikavist sølukvota og uppboðsárskvota, latin til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49. Kapittul 4 verður við hesum broytingaruppskoti ikki longur ein kapittul um uppboðssølu í 2020, men um tær kvotur, sum sambært lógini á ymiskan hátt skulu og kunna verða settar av til vinnuligar royndir og verkætlanir. Heitið verður tí broytt."*

Viðmerkingarnar til § 14 í broytingaruppskotinum eru soljóðandi:

*"§ 14 fevnir um tær ásetingar, sum í upprunauppskotinum vóru partur av § 49, stk. 2, og sum snúgva seg um vinnuligar royndir og verkætlanir. Mett verður, at tað er mest skynsamt at samla allar ásetingar, sum viðvíkja teimum nøgdum, ið verða settar av til vinnuligar royndir og verkætlanir á einum stað."*

Viðmerkingarnar til § 49, stk. 2 í upprunauppskotinum eru soljóðandi:

*"Stk. 2. Við uppskotinum verður farið frá menningarkvotunum, sambært løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, til eina skipan, har tað ikki verður tikið nakað økisrættarligt fyrilit. Talan er heldur um eitt slag av víðkan av verandi skipan við vinnuligum royndum við tað, at landsstýrismaðurin skal seta 8,5% av tøku føroysku kvotuni av makreli, norðhavssild og svartkjafti til vinnuligar royndir og verkætlanir.*

*Verandi menningarkvotur, ið eru latnar sambært sjófeingislógini, verða tó partar av hesi nøgd, so leingi tær eru í gildi, samanber skiftisregluna í § 10, stk. 3. Hetta merkir eisini, at um verandi menningarkvotur verða lagdar um til eginkvotur, verður tað tikið av teimum 8,5%."*

§ 15 ásetir, hvussu partur av heildarkvotuni í 2020 av svartkjafti, norðhavssild og makreli verður sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49, og § 16 ásetir, hvussu ásetti parturin til vinnuligar royndir og verkætlanir frá og við 2021 broytist, tá heildarkvotan broytist.

Eisini ásetingarnar í §§ 15 og 16 eru settar inn við einum broytingaruppskoti frá minnilutanum (samgonguumboðunum) í vinnunevndini, ið varð samtykt eftir 2. viðgerð í løgtinginum tann 19. desember 2019.

Hesi broytingaruppskotini eru soljóðandi:

*"§ 15 verður orðað soleiðis:*
*"§ 15. Av tí parti av heildarkvotuni í 2020, sum er lægri ella ájavnt við ásettu mørkini í nr. 1-3, verða ávikavist 14,8%, 8,7% og 8,7% av nøgdini sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49:*
*1) 350.000 tons av svartkjafti.*
*2) 90.000 tons av makreli.*
*3) 85.000 tons av norðhavssild.*
*Stk. 2. Er heildarkvotan í 2020 størri enn mørkini, ásett í stk. 1, nr. 1-3, skal landsstýrismaðurin, umframt nøgdina sett av sambært stk. 1, seta av ta nøgd, sum er omanfyri mørkini, til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49."*

*§ 16 verður orðað soleiðis:*
*"§ 16. Fyri rættindi sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 15, stk. 1, fylgir nøgdin lutfalsliga vøkstrinum og niðurskurðinum í heildarkvotuni upp til mørkini ásett í § 15, stk. 1, nr. 1-3.*
*Stk. 2. Er heildarkvotan í 2020 ájavnt ella undir mørkunum, ásett í § 15, stk. 1, nr. 1-3, fylgir nøgdin, sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir, sambært § 15, stk. 1, frá og við 2021 lutfalsliga vøkstrinum og niðurskurðinum í heildarkvotuni, eisini tá heildarkvotan er oman fyri mørkini.*
*Stk. 3. Er heildarkvotan í 2020 oman fyri mørkini sambært § 15, stk. 1, nr. 1-3, verður fyri tann partin av heildarkvotuni, sum frá og við 2021 er oman fyri heildarkvotuna í 2020, sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir, ein lutfalsligur partur, sum samsvarar við tann lutfalsliga part av kvotuni, sum nøgdin, sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 15, stk. 1, hevði av heildarkvotuni í 2020.*
*Stk. 4. Fyri rættindi sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 15, stk. 2 fylgir nøgdin lutfalsligu broytingunum í heildarkvotuni, tá heildarkvotan er oman fyri heildarkvotuna í 2020. Er heildarkvotan undir heildarkvotuna í 2020, lækkar nøgdin at seta av til vinnuligar royndir og verkætlanir við somu nøgd, sum heildarkvotan lækkar, til heildarkvotan er á markinum sambært § 15, stk. 1, nr. 1-3. Fer heildarkvotan upp um markið, sambært § 15, stk. 1, nr. 1-3, hækkar nøgdin at seta av til vinnuligar royndir og verkætlanir við somu nøgd, sum heildarkvotan er oman fyri markið, til heildarkvotan er ájavnt við heildarkvotuna í 2020."*

Viðmerkingarnar til § 15 í broytingaruppskotinum eru soljóðandi:

*"Lagt verður við hesum upp til, at § 15 í upprunauppskotinum verður strikað, tí talan er um ásetingar, ið viðvíkja søluni, sum skuldi verða í 2020; uppboðssøla, sum við hesum broytingaruppskoti, verður strikað.*

*Ein broytt § 15 verður ístaðin sett inn, sum sigur, hvussu nógv av heildarkvotunum av svartkjafti, makreli og norðhavssild í 2020 verður sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir. Talan er um nøgdir, sum verða settar av, umframt tær nøgdir, ið eru fevndar av § 14.*

*§ 15 líkist nógv § 14 í upprunauppskotinum men er tillagað nakað. Ístaðin fyri at áseta, hvussu stórar nøgdir skulu setast av til ávikavist sølukvotu og uppboðsárskvotu, snúgva ásetingarnar seg nú um, hvussu stórar nøgdir skulu setast av til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49.*

*Stk. 1 ásetir, at í 2020 verður ávís nøgd av svartkjafti, makreli og norðhavssild sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir. Tað er í 2020, at nøgdin verður ásett, tí § 16 ásetir, hvussu hesar nøgdir árini aftaná flyta seg við broytingum í heildarkvotuni.*

*Settar verða av hesar nøgdir:*

- *14,8% av heildarkvotuni av svartkjafti, tó í mesta lagi 14,8% av 350.000 tonsum.*
- *8,7% av heildarkvotuni av makreli, tó í mesta lagi 8,7% av 90.000 tonsum.*
- *8,7% av heildarkvotuni av norðhavssild, tó í mesta lagi 8,7% av 85.000 tonsum.*

*Nøgdirnar í stk. 1 fyri svartkjaft og norðhavssild samsvara við tær nøgdir, sum sambært galdandi lóggávu høvdu verið bodnar út sum sølukvotur í 2020 (tó frádrigið tað nøgd, sum longu er seld sum 3 og 8 ára rættindi). Í mun til upprunauppskotið er ein broyting fyri svartkjaft, har 14,5% er broytt til 14,8%, tí tað eru 10,2% av heildarkvotuni, sum eru sett av til 3 og 8 ára rættindi og ikki 10,5%.*

*Fyri makrel er ásett at 8,7% av tí parti av heildarkvotuni, sum í 2020 er lægri ella ájavnt við markið á 90.000 tons, verður sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir.*

*Ein onnur broyting í mun til upprunauppskotið er, at lagt verður upp til at markið fyri norðhavssild verður hækkað úr 65.000 tons upp í 85.000 tons. Við hesi broyting verða tær nøgdir, sum í upprunauppskotinum skulu seljast, men við hesum uppskotinum partvís verða lagdar um til vinnuligar royndir og verkætlanir, minni.*

*Stk. 2 ásetir, at er heildarkvotan í 2020 oman fyri mørkini, skal nøgdin omanfyri markið latast til vinnuligar royndir og verkætlanir. Hendan nøgdin kemur umframt nøgdina sambært stk. 1. Er heildarkvotan av t.d. norðhavssild 90.000 tons, skulu 8,7% av 85.000 tonsum = 7.395 tons latast til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært stk. 1, og 5.000 tons latast sambært stk. 2 (nøgdin omanfyri markið: 90.000-85.000 = 5.000 tons). Samanlagt skulu sostatt setast 12.395 tons av til vinnuligar royndir og verkætlanir.*

*Talva 1 niðanfyri vísir eitt hugsað dømi um nøgdir settar av til vinnuligar royndir og verkætlanir fyri makrel, svartkjaft og norðhavssild í 2020. Fyri makrel og svartkjaft eru*

*heildarkvoturnar undir markinum, tí verður einans sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 15, stk. 1. Sett verða av 8,7% av heildarkvotuni av makreli, sum samsvara við 7.100 tons, og 14,8% av heildarkvotuni av svartkjafti, sum eru 42.920 tons. Fyri norðhavssildina verður sett av bæði sambært § 15, stk. 1 og 2, samanlagt 12.395 tons.*

***Talva 1: Eitt hugsað dømi um kvotu av makreli, svartkjafti og norðhavssild sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir fyri í 2020***

| *Tons í 2020* | *Makrelur* | *Svartkjaftur* | *Norðhavssild* |
|---|---|---|---|
| *Heildarkvota* | *85.000* | *290.000* | *90.000* |
| *Nøgd til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 15, stk. 1* | *7.100* | *42.920* | *7.395* |
| *Nøgd til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 15, stk. 2* | *0* | *0* | *5.000* |
| *Nøgd samanlagt sambært § 15* | *7.100* | *42.920* | *12.395* |

*Í viðmerkingunum til § 16 í upprunauppskotinum er nærri útgreinað, hvussu hesi rættindi eftir 2020 flyta seg í mun til hækkingar og lækkingar í heildarkvotum yvir ár."*

Fyri betri at skilja tilvísingina í viðmerkingunum til § 15, stk. 1, til tey rættindi, ið longu er seld sum 3 og 8 ára rættindi, er ásetingin í § 9, stk. 1 í lógini eisini viðkomandi. Hendan er soljóðandi:

*"Persónur ella felag, sum í 2018 ella 2019 hevur keypt 3 ella 8 ára rættindi á uppboði, kann við gildiskomu løgtingslógarinnar halda fram og fær í 2020 tillutað veiðirættindi, samsvarandi ásetingum í § 19, stk. 5 í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, tó verður nøgd rættindahavarans tillutað eftir mørkunum í § 15, stk. 1. Uppboðssølugjaldið, sambært § 19, stk. 7 í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, verður bert rindað fyri nøgdina, sum er tillutað samsvarandi § 19, stk. 5 í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi. Frá 1. januar 2020 fylgja rættindini til botnfisk í Barentshavinum lutfalsliga vøkstrinum og niðurskurðinum í heildarkvotuni. Rættindini til svartkjaft, makrel og norðhavssild fylgja lutfalsliga vøkstrinum og niðurskurðinum í heildarkvotuni, eins og kvotur sambært § 15, stk. 1."*

Viðmerkingarnar til § 16 í broytingaruppskotinum eru soljóðandi:

*"§ 16 er í orðaljóði líknandi § 16 í upprunauppskotinum, tó soleiðis at ístaðin fyri, at greinin upplýsir, hvussu sølukvotan og uppboðsárskvotan flyta seg við broytingum í heildarkvotuni, sigur greinin nú, hvussu nøgdirnar settar av til vinnuligar royndir og verkætlanir í 2020, samsvarandi ásetingunum í § 15, stk. 1 og 2, flyta seg eftir 2020. Talan er um somu skipan sum í upprunauppskotinum."*

Viðmerkingarnar til § 16 í upprunauppskotinum eru soljóðandi:

*"Stk. 1 ásetir, hvussu keypt nøgd av kvotu, sambært § 14, stk. 1 (sølukvotan), broytist við heildarkvotuni. Upp til mørkini, sum eru ásett í stk. 1, fylgja keyptu nøgdirnar hækkingum og lækkingum í heildarkvotuni lutfalsliga.*

*Stk. 2 ásetir, at er støðan í 2020 soleiðis, at heildarkvotan er ájavnt ella undir mørkunum, tá fylgja keyptu kvoturnar hækkingum og lækkingum í heildarkvotuni, eisini tá kvotan eftir 2020 er omanfyri markið.*

*Talva 4.2 vísir, hvussu ymisku kvoturnar flyta seg yvir ár, har útgangsstøðið verður tikið í, at heildarkvotan av makreli í 2020 er niðan fyri hámarkið, sambært § 14, stk. 1.*

*Heildarkvotan er tann nøgd, sum er eftir, eftir býtið við onnur lond, og tá kvota er sett av til gransking og hjáveiðu og til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49, stk. 2.*

*Sum talvan vísir, verða 8,7% av heildarkvotuni á 53.161 tons, t.v.s. 4.625 tons, seld sum sølukvota. Ein partur verður latin teimum, sum í 2018 og 2019 hava keypt sær 3 og 8 ára rættindi á uppboði, sum eisini ásett í § 9. Talan er um 3.349 tons í 2020 (6,3% av 53.161 tonsum).*

*Restin av kvotuni undir markinum verður útlutað øðrum rættindahavarum, sum undir løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi hava fingið útlutað kvotur av hesum fiskasløgum. Hesir fáa sambært døminum 45.186 tons.*

*Eingin nøgd er at bjóða út sum uppboðsárskvota ella at seta av til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært ásetingunum í § 14, men 8,5% av tøku føroysku kvotuni verða sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært ásetingum í § 49, stk. 2. Í yvirlitinum er nøgdin øll árini sett til 8,5 % av tøku kvotuni. Hetta kann broytast,um verandi menningarverkætlanir verða lagdar um til egnar kvotur, sambært ásetingunum í § 10, stk. 3 og 4.*

*Í 2021 hækkar heildarkvotan til 95.000 tons, men hóast hetta er omanfyri markið, nevnt í § 14, stk. 1, verður eingin uppboðsárskvota seld á uppboði, tí heimildin at selja er bert fyri 2020, og heildarkvotan er disponerað yvir, samsvarandi § 16, stk. 2. Ístaðin verður kvotan útlutað millum teir aktørar, sum hava lut í kvotuni í 2020, har øll fáa sín lutfalsliga part av hækkingini, sum eisini ásett í § 16, stk. 2. Tá kvotan aftur lækkar, lata eisini øll lutfalsliga, sum lýst við døminum niðanfyri fyri ár 2022, tá kvotan aftur lækkar.*

***Talva 4.2: Dømi um, hvussu ymisku makrelkvoturnar broytast, tá heildarkvotan av makreli í 2020 er niðan fyri ásetta hámarkið***

| *Makrelur* | *2020* | *2021* | *2022* | *2023* | *2024* | *2025* |
|---|---|---|---|---|---|---|
| *Mørk í lógini* | *90.000* | *90.000* | *90.000* | *90.000* | *90.000* | *90.000* |
| *Tøk føroysk kvota* | *82.400* | *140.000* | *96.000* | *105.000* | *111.000* | *120.000* |
| *Kvota nýtt til býti við onnur lond; sett av til gransking, hjáveiðu.* | *22.235* | *33.100* | *23.515* | *25.318* | *23.732* | *24.184* |
| *Nøgd til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49, stk. 2.* | *7.004* | *11.900* | *8.160* | *8.925* | *9.435* | *10.200* |
| *Heildarkvota* | *53.161* | *95.000* | *64.325* | *70.757* | *77.833* | *85.616* |
| *Onnur* | *45.186* | *80.750* | *54.676* | *60.143* | *66.158* | *72.774* |
| *3 og 8 ára rættindi* | *3.349* | *5.985* | *4.055* | *4.458* | *4.905* | *5.394* |
| *Sølukvota* | *4.625* | *8.265* | *5.596* | *6.156* | *6.770* | *7.448* |
| *Onnur, 3 og 8 ára rættindi og sølukvota* | *53.161* | *95.000* | *64.325* | *70.757* | *77.833* | *85.616* |
| *Nøgd til uppboðsárskvotu/-vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 14* | *0* | *0* | *0* | *0* | *0* | *0* |
| *Hækking/lækking í heildarkvotu* | *0* | *41.839* | *-30.675* | *6.432* | *7.076* | *7.783* |

*Stk. 3. Í lógaruppskotinum verður skilt ímillum sølukvotu og uppboðsárskvotu (§ 14, stk. 1 og 2). Hetta verður gjørt, tí munur er á, hvussu kvoturnar flyta seg í mun til broytingarnar í heildarkvotunum. Í § 16, stk. 3 er ásett, at um heildarkvotan í 2020 er omanfyri mørkini, fær tann, sum hevur keypt kvotu sambært § 14, stk. 1, sín lutfalsliga part av kvotuni undir markinum, og hann fær eisini part av tí kvotu, sum er omanfyri heildarkvotuna í 2020. Parturin av kvotuni omanfyri heildarkvotuna í 2020, er lutfallið av heildarkvotuni í 2020. Keypir ein persónur t.d. 1.000 tons av norðhavssild, sum sølukvotu í 2020, og heildarkvotan í 2020 er 100.000 tons, ímeðan heildarkvotan í 2021 er 110.000 tons, fær hesin persónur í 2021 tillutað 1.100 tons av norðhavssild (1.000 tons + 1/100 av 10.000 tonsum).*

*Stk. 4 ásetir, hvussu uppboðsárskvotan flytur seg. Tá heildarkvotan er hægri enn heildarkvotan í 2020, fáa hesar kvotur sín lutfalsliga part av hækkingini og gjalda lutfalsliga, tá kvotan lækkar aftur. Lutfallið er kvotan í 2020 samanborið við heildarkvotuna. Um heildarkvotan lækkar og gerst lægri enn heildarkvotan í 2020, er tað uppboðsárskvotan/kvotan til vinnuligar royndir og verkætlanir, sum lækkar samsvarandi lækkingunum í heildarkvotuni, inntil einki er eftir. Økist heildarkvotan aftur, er tað eisini bert uppboðsárskvotan/kvota til vinnuligar royndir og verkætlanir, sum fær lut í hækkingini frá markinum, inntil heildarkvotan aftur er á støði við 2020-kvotuna.*

**Talva 4.3: Dømi um, hvussu ymisku kvoturnar av norðhavssild broytast, tá heildarkvotan av norðhavssild í 2020 er oman fyri ásetta hámarkið**

| Norðhavssild | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Mørk í lógini | 65.000 | 65.000 | 65.000 | 65.000 | 65.000 | 65.000 |
| Tøk føroysk kvota | 117.647 | 138.000 | 150.000 | 98.000 | 80.000 | 105.000 |
| Kvota nýtt til býti við onnur lond; sett av til gransking, hjáveiðu. | 12.647 | 13.730 | 13.456 | 10.442 | 9.818 | 11.075 |
| Nøgd til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49, stk. 2. | 10.000 | 11.730 | 12.750 | 8.330 | 6.800 | 8.925 |
| Heildarkvota | 95.000 | 112.540 | 123.794 | 79.228 | 63.382 | 85.000 |
| Onnur | 55.250 | 65.451 | 71.996 | 55.250 | 53.875 | 55.250 |
| 3 og 8 ára rættindi | 4.095 | 4.851 | 5.336 | 4.095 | 3.993 | 4.095 |
| Sølukvota | 5.655 | 6.699 | 7.369 | 5.655 | 5.514 | 5.655 |
| Nøgd til uppboðsárskvotu/vinnu-ligar royndir og verkætlanir | 30.000 | 35.539 | 39.093 | 14.228 | 0 | 20.000 |
| -harav at bjóða út sum uppboðsárskvota | 17.173 | 20.343 | 22.377 | 8.144 | 0 | 11.448 |
| -harav at lata til vinnuligar royndir og verkætlanir | 12.828 | 15.196 | 16.715 | 6.084 | 0 | 8.552 |
| Øking/minking í heildarkvotu millum ár | 0 | 17.540 | 11.254 | -44.566 | -15.846 | 21.618 |

*Viðmerking: Býtið í talvuni, til ávikavist at bjóða út sum uppboðsárskvota og at lata til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært ásetingum í § 14, er nærri útgreinað undir viðmerkingunum til § 14. Gjørt verður eisini vart við, at í yvirlitinum er nøgdin til vinnuligar royndir og verkætlanir,sambært § 49, stk. 2, øll árini sett til 8,5% av tøku kvotuni. Hetta kann broytast,um verandi menningarverkætlanir verða lagdar um til egnar kvotur, sambært ásetingunum í § 10, stk. 3 og 4.*

*Talva 4.3 vísir, hvussu ymisku kvoturnar flyta seg yvir ár, tá støðan er sum lýst í § 16, stk. 3 og 4. Útgangsstøði verður tikið í, at heildarkvotan av norðhavssild í 2020 er omanfyri hámarkið sambært § 14, stk. 1.*

*Heildarkvotan er tann nøgd, sum er eftir, eftir býtið við onnur lond, og tá kvota er sett av til gransking og hjáveiðu og til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49, stk. 2.*

*Sum yvirlitið vísir, verða 8,7% av heildarkvotuni upp til 65.000 tons seld sum sølukvota í 2020. Restin av kvotuni, undir markinum, verður latin teimum persónum ella feløgum, sum í 2018 og 2019 hava keypt sær 3 og 8 ára rættindi av norðhavssild og øðrum (t.e. tey, sum søguliga hava havt lut í hesum kvotum).*

*Tann partur av heildarkvotuni, sum er oman fyri markið, verður settur av til uppboðsárskvotu/kvotu til vinnuligar royndir og verkætlanir, t.e. samanlagt 30.000 tons. Við støði í ásetingunum í § 14, stk. 3 er síðani gjørt eitt býti av nøgdini til ávikavist tann part, sum skal bjóðast út sum uppboðsárskvota, og tann partin, sum skal latast til vinnuligar royndir og verkætlanir, sambært § 49. Nærri frágreiðing, um hvussu komið verður fram til tølini, er at finna í viðmerkingunum til § 14, stk. 3, har støðið verður tikið í júst sama taldømi sum í talvu 4.3.*

*Eftir 2020 vera ikki fleiri sølur, og møguligar hækkingar í heildarkvotuni verða tí lutaðar út millum tey, sum longu hava part av heildarkvotuni. Í 2021 hækkar heildarkvotan til 112.540 tons. Yvirlitið vísir, at allar kvotur fáa lutfalsligan lut í teimum 15.196 tonsunum, sum kvotan hækkar frá 2020 til 2021, við støði í lutinum av 2020-kvotuni. Hetta sama ger seg galdandi í 2022, tá heildarkvotan áhaldandi hækkar og er oman fyri heildarkvotuna í 2020.*

*Í 2023 lækkar heildarkvotan og er undir nøgdini av heildarkvotuni í 2020. Sum yvirlitið vísir, lækka allar kvotur lutfalsliga niður til markið, sum er heildarkvotan í 2020. Síðani er tað bert uppboðsárskvotan/kvotan, sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir, sum lækkar tey 15.772 tonsini, sum heildarkvotan í 2023 er lægri enn heildarkvotan í 2020.*

*Í 2024 er ein nýggj støða, tí heildarkvotan lækkar nú niður um markið í lógini sambært § 14, stk.1. Lækkingin frá 2024 til 2025 er 15.846 tons. Tey fyrstu 14.228 tonsini verða, sambært ásetingum í § 16, stk.4, "tikin" frá uppboðsárskvotuni/kvotuni til vinnuligar royndir og verkætlanir, til hon er heilt burtur. Eftir er ein lækking á 1.618 tons, sum allar kvotur, sum eru eftir, t.e. 3 og 8 ára rættindi, sølukvotan og onnur, lata lutfalsliga til.*

*At enda er eitt dømi um, hvussu farið verður fram, um heildarkvotan síðani hækkar aftur upp um mørkini í § 14, stk. 1. Í 2025 hækkar heildarkvota uppá 85.000 tons, og allar kvotur hækka lutfalsliga upp til markið, til tær eru á tí støði, sum tær vóru í 2020. Síðani er tað bert uppboðsárskvotan, sum hækkar við teirri nøgd av heildarkvotuni, sum er eftir, t.e. til 20.000 tons."*

Ásetingin í § 17 og viðmerkingarnar til hesa áseting eru soljóðandi:

*"§ 17. Rættindi, ið falla aftur til landið eftir hesi løgtingslóg, kunnu setast av til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49 ella royndarfiskiskap o.a. sambært § 50."*

*"Til § 17.*
*Hendan greinin heimilar landsstýrismanninum at seta av til vinnuligar royndir og verkætlanir, sambært § 49, ella seta av til royndarfiskiskap o.a., sambært § 50, tey veiðirættindi, ið falla aftur til landið eftir ásetingunum í lógini. Her kann t.d. vera talan um rættindi, sum falla aftur til landið, orsakað av brúksskylduni."*

Ásetingarnar í kap. 4 (§§ 14-17), í galdandi lóg um sjófeingi, ella kanska serliga uppskotið til kap. 4, áðrenn tað varð broytt undir 2. viðgerð í løgtinginum, svara í sínum orðaljóðið í ávísan mun til ásetingina sum varð at finna í § 15 í lógini um fyrisiting av sjófeingi.

Ásetingin í § 15 í lógini um fyrisiting av sjófeingi varð soljóðandi:

*"§ 15. Um heildarkvotan er lægri ella ájavnt við ásettu nøgdirnar í nr. 1-6, verða ávikavist 25%, 15%, 15%, 15%, 15% og 15% av nøgdini bjóðað út sum sølukvota:*
*1) 350.000 tons av svartkjafti.*
*2) 90.000 tons av makreli.*
*3) 65.000 tons av norðhavssild.*
*4) 27.000 tons av botnfiski í Barentshavinum.*
*5) 3.100 tons av toski á Flemish Cap.*
*6) 1.900 tons av botnfiski í Eysturgrønlandi.*
*Stk. 2. Er heildarkvotan størri enn nøgdirnar, ásettar í stk. 1, nr. 1-6, verður nøgdin, sum er omanfyri, boðin út á uppboði sum uppboðsárskvota, samanber tó § 18."*

Viðmerkingarnar til § 15, svara eisini í stóran mun til viðmerkingarnar til uppskotið til kap. 4, áðrenn tað varð broytt undir 2. viðgerð í løgtinginum, tó at tær útgreina rættindi hjá verandi rættindahavarum eitt sindur neyvari.

Kap. 3 í lógini um fyrisiting av sjófeingi savnaði annars allar reglur um "*Atgongd til fiskiskap*" undir einum; herundir eisini reglur svarandi til ásetingarnar í §§ 7 og 8, stk. 1 í galdandi lóg um sjófeingi, ið eisini mugu roknast at hava týdning, í tilknýti til eina útgreining av rættindunum hjá "søguligu aktørunum".

§ 7 er soljóðandi:

*"§ 7. 2 Veiðiloyvið er galdandi til 1. januar 2034. Tá veiðiloyvið fer úr gildi, fara øll veiðirættindi samstundis úr gildi.*
*Stk. 2. Rætturin til fiskiloyvi í bólki 5 og rætturin til onnur fiskiloyvi hjá fiskifari í hesum bólki er galdandi til 1. januar 2034.*
*Stk. 3. Á hvørjum ári leggur landsstýrismaðurin uppskot fyri Løgtingið, um gildistíðin á rættindum, sambært stk. 1 og 2, skal leingjast við einum ári.*
*Stk. 4. Áðrenn 20. februar á hvørjum ári leggur landsstýrismaðurin fyri Løgtingið frágreiðing sambært § 51, stk. 4 í Tingskipan Løgtingsins um fyrisiting av sjófeingi og teimum veiðirættindum, Føroyar hava uttan fyri føroyskan sjógv, og hvørjar ætlanir hann hevur í hyggju at fremja. Frágreiðingin verður fyrstu ferð løgd fram í 2021."*

Viðmerkingarnar til § 7, stk. 1-3 eru soljóðandi:

*"Stk. 1. Veiðiloyvi eru sambært hesi áseting galdandi til 1. januar 2032 og fáa sostatt eina gildistíð uppá 12 ár. Hetta er ein broyting sammett við galdandi løgtingslóg, har gildistíðin er 8 ár.*

*Øll rættindini hjá tí einstaka fiskifarinum at fiska eru knýtt at fiskifarinum í fiskiloyvi. Treytin fyri at fáa fiskiloyvi er, at fiskifarið hevur veiðiloyvi. Fer veiðiloyvið úr gildi, falla øll veiðirættindi hjá fiskifarinum burtur.*

*Stk. 2. Fiskiførini í bólki 5 nýtast sambært lógini ikki veiðiloyvi, men tey skulu, eins og fiskiførini annars, vera vard við 12 ára gildistíð. Tí er ásett, at rætturin til fiskiloyvi í*

*bólki 5, sambært § 19, stk. 1, og onnur fiskiloyvi hjá hesum bátum, er galdandi til 1. januar 2032, og hava sostatt eina gildistíð á 12 ár eins og veiðiloyvir. Onnur fiskiloyvi kunnu t.d. vera loyvi at fiska hummara.*

*Stk. 3 ásetir, at landsstýrismaðurin eins og í galdandi lóggávu á hvørjum ári skal leggja uppskot fyri Løgtingið, um gildistíðin á rættindunum skal leingjast fyri 1 ár í senn út yvir tað, sum upprunaliga er ásett."*

Ásetingin í § 7, stk. 4 er sett inn við einum broytingaruppskoti frá minnilutanum (samgonguumboðunum) í vinnunevndini (Álit í løgtingsmálinr.15/2019: Uppskot til løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin)), ið varð samtykt eftir 2. viðgerð í løgtinginum tann 19. desember 2019.

Viðmerkingarnar til hetta broytingaruppskotið eru soljóðandi:

"*Við hesum verður ásetingin førd víðari frá galdandi reglum um, at tað er álagt landsstýrismanninum at koma við frágreiðing sbrt. § 51, stk. 4 í Tingskipanini til aðalorðaskifti um fyrisiting av sjófeingi og hvørjar ætlanir, hann hevur í hyggju at fremja. Frágreiðingin skal tó verða løgd fram innan 20. februar heldur enn 1. oktober, fyrstu ferð í 2021. Ætlanin er eins og í galdandi lóggávu, at frágreiðingin skal viðgera gongdina og støðuna í fiskivinnuni á sjógvi og á landi og um framtíðarútlit. Frágreiðingin skal viðgera búskaparlig, samfelagslig og lívfrøðilig viðurskifti av týdningi fyri fiskivinnuna. Onnur viðurskifti, sum skulu lýsast og viðgerast, eru altjóða avtalur við onnur lond og onnur skipanarlig viðurskifti t.d. nýggj lóggáva/kunngerðir og framtíðar ætlanir hesum viðvíkjandi."*

§ 7, svarar í ávísan mun til § 21 í løgtingslóg nr. 161 frá 18. desember 2017 um fyrisiting av sjófeingi, sum varð soljóðandi:

"*§ 21. Rættindi sambært hesi løgtingslóg, tó undantikið rættindini sambært §§ 14-16, § 17, stk. 1 og 2, § 18, stk. 1 og stk. 3, 1. pkt., §§ 58-61 og §§ 73 og 74, eru galdandi til 1. januar 2027. Á hvørjum ári leggur landsstýrismaðurin uppskot fyri Løgtingið, um gildistíðin á rættindum skal leingjast við einum ári.*
*Stk. 2. Hóast latin søgulig rættindi sbrt. stk. 1, kann Løgtingið, uttan endurgjald, á hvørjum ári ráða yvir upp til 3% av útlutaðum søguligum rættindum, undantiknar kvotur, ið eru bjóðaðar út á uppboðssølu, at seta av til onnur endamál. Tá álmanakkaárið er farið, falla tey 3%, sum Løgtingið hevur fingið at ráða yvir av teimum útlutaðu søguligum rættindunum, aftur til rættindahavaran, so hesin fær fullan ræðisrætt aftur til tey 3%, sum hann hevði, áðrenn Løgtingið fór at ráða yvir teimum. Tað, at ræðisrætturin fyri tey nevndu 3% av útlutaðum søguligum rættindum, falla aftur til rættindahavaran, tá álmanakkaárið er farið, merkir ikki, at talan er um øking av rættindum hjá rættindahavara sbrt. § 10, stk. 11.*
*Stk. 3. Áðrenn 1. oktober á hvørjum ári leggur landsstýrismaðurin fyri Løgtingið frágreiðing sambært § 51, stk. 4 í Tingskipan Løgtingsins um støðuna í fyrisitingini av*

*sjófeingi og teimum veiðirættindum, Føroyar hava uttan fyri føroyskan sjógv, og hvørjar ætlanir hann hevur í hyggju at fremja.*
*Stk. 4. Sum grundarlag fyri frágreiðingini í stk. 3 verður heimilað landsstýrismanninum at áleggja loyvishavarum við umsetningi omanfyri 10 milliónir kr. at lata frágreiðing um virksemið teirra, ið knýtir seg at fiskiloyvinum. Landsstýrismaðurin kann biðja um upplýsingar um virksemi, ið knýtir seg at rættindunum."*

Viðmerkingarnar til § 21 í eru soljóðandi:

*"Stk. 1. Her er ásett, at rættindi sambært lógini, undantikið rættindi boðin út á uppboði, og rættindi latin til royndarfiskiskap, menningarætlanir og gransking, eru galdandi til 1. januar 2026. Fiskidagar og loyvi til fiskidagaskipanin undir Føroyum, sum verða boðin út, eru tó ikki undantikin, men hava somu gildistíð, sum t.d. tey fiskiloyvi og fiskidagar, sum eru útlutað sambært grein 26-27.*

*Landsstýrismaðurin skal á hvørjum ári leggja uppskot fyri Løgtingið, um gildistíðin á rættindunum skal leingjast fyri 1 ár í senn út yvir tað, sum upprunaliga er ásett. Á henda hátt hevur vinnan rúma tillagingartíð, um Løgtingið ynskir at gera broytingar, sum lata loyvini fara úr gildi. Útgangsstøðið er, at tað er landsstýrismaðurin, ið leggur uppskot fyri Løgtingið um at leingja gildistíðina, samstundis sum frágreiðing, sbrt. stk. 2, verður latin.*

*Stk. 2. Skipanin, ið verður sett í gildi við hesum lógaruppskoti, víkir í stóran mun frá galdandi reglum, og tískil verður tað álagt landsstýrismanninum at koma við frágreiðing til aðalorðaskiftis (frágreiðing sbrt. grein 51, stk. 4 í Tingskipanini) um støðuna og hvørjar ætlanir, hann hevur í hyggju at fremja. Ætlanin er, at frágreiðingin skal viðgera gongdina og støðuna í fiskivinnuni á sjógvi og á landi og væntanir til framtíðarútlit. Frágreiðingin skal viðgera búskaparlig, samfelagslig og lívfrøðilig viðurskifti av týdningi fyri fiskivinnuna. Búskaparligu viðurskiftini eru um fíggjarligu gongdina hjá flotanum og virkjum, sosial atlit eru t.d. um gongdina í tali av arbeiðsplássum, og hvussu virksemið er býtt kring landið o.s.fr. Til seinast skal frágreiðingin lýsa og viðgera lívfrøðilig hagtøl, eitt nú um støðuna og útlitini í fiskastovnunum. Onnur viðurskifti, sum skulu viðgerast, eru altjóða avtalur við onnur lond og onnur skipanarlig viðurskifti t.d. viðvíkjandi sølu av rættindum og nýggj lóggáva/kunngerðir og framtíðar ætlanir hesum viðvíkjandi."*

Fyri at skilja víddina av § 21, er eisini neyðugt at fara inn í § 18, sum er soljóðandi:

*"§ 18. Nýggj rættindi at veiða kunnu verða boðin út á uppboði sum sølukvota.*
*Stk. 2. Sum nýggj rættindi eru at skilja fiskiskapur, ið ikki áður hevur verið avmarkaður í føroyskari lóggávu við loyvistali, kvotum ella fiskidøgum, fiskaslag, ið ikki áður hevur verið gagnnýtt í føroyskum fiskiskapi, øktar kvotur ella nýggj rættindi, sammett við kvoturnar 2018, sambært sínámillum fiskiveiðiavtalum ella øking í føroyska partinum av mest loyvdu veiðu fyri fiskiskap, sambært samtyktum í økisbundnum fiskiveiðifelagsskapum og eftir millumlanda avtalum. Undantikin eru fiskasløg og fiskiskapur sambært § 15.*

*Stk. 3. Umframt nøgdirnar, sum, sambært § 15, stk. 1, skulu bjóðast út sum sølukvota, kunnu rættindi, ið falla aftur til landið eftir hesi løgtingslóg, verða boðin út á uppboði sum sølukvota. Tá talan er um fiskidagaskipanina undir Føroyum, sambært §§ 26 og 27, skulu rættindini bjóðast út sum loyvi ella fiskidagar.*
*Stk. 4. Loyvi ella fiskidagar, sambært stk. 3, skulu bjóðast út í sama bólki sambært § 26, sum tey vóru í frammanundan.*
*Stk. 5. Fyri fiskidagar og loyvi, sum verða boðin út sambært stk. 3, er gildistíðin tann sama sum fyri rættindi sambært §§ 26 og 27."*

Viðmerkingarnar til § 18 í eru soljóðandi:

*"Greinin heimilar landsstýrismanninum at bjóða út á uppboði ávikavist nýggj rættindi, og rættindi,sum falla aftur til landið eftir ásetingum í lógini.*

*Stk. 1 ásetir, at nýggj rættindi verða boðin út sum sølukvota.*

*Stk. 2 nágreinar hugtakið "nýggj rættindi" sum rættindi, ið ikki áður hava verið skipað í føroyskari lóggávu ella fiskaslag, sum ikki áður hevur verið gagnnýtt. Einki er, sum forðar fyri, at fiskaslagið hevur ella er gagnnýtt av øðrum londum, tað avgerandi er, at tað ikki hevur verið gagnnýtt í føroyskum øki ella av føroyskum skipum. Sama ger seg galdandi fyri rættindi, sum ikki áður hava verið skipað í føroyskari lóggávu. Talan er eisini um nýggj rættindi, tá øktar kvotur ella nýggj rættindi verða avtalaðar við onnur lond, ella tá føroyski luturin av mest loyvdu veiðu økist í samráðingum við onnur lond, ella at Føroyar einsæris seta sær størri lut. Rættindi, sum longu eru skipað í grein 15, eru undantikin. Ein øking í føroyska lutinum í kongafiskakvotuni í Irmingerhavinum er sostatt at skilja sum nýggj kvota, sum heimild er at bjóða út sambært hesi grein. Til samanberingar skal ein øking í lutfallinum av føroysku kvotuni av t.d. makreli ella svartkjafti viðgerast sambært grein 15.*

*Stk. 3. Rættindi, sum eftir lógini falla aftur til landið, kunnu verða boðin út sum sølukvota. Tá talan er um fiskidagaskipanina undir Føroyum, sambært greinunum 26-27, verða rættindini tó ikki boðin út sum sølukvota, men skulu bjóðast út sum loyvir ella fiskidagar. Rættindi, fevnd av ásetingini, eru rættindi, sum falla aftur til landið orsakað av brúksskylduni, rættindi, sum falla aftur til landið í sambandi við sølu (bæði í sjálvbodnari sølu og tvingsilssølu), ella tí eigarin ikki lýkur treytirnar í lógini. Eitt annað dømi eru rættindi, ið falla aftur til landið orsakað av revsireglum, ella rættindi, sum eru seld á uppboði við ávísari gildistíð, sum gongur út.*

*Stk. 4 ásetir, at loyvi ella fiskidagar undir fiskidagaskipanini, sum falla aftur til landið, skulu bjóðast út í sama bólki, sum tey vóru í, áðrenn tey vóru tikin aftur. Eru fiskidagar í bólki 4T t.d. falnir fyri brúksskylduni í grein 41, so kunnu hesir dagar bert bjóðast út aftur til loyvishavarar í bólki 4T. Er eitt loyvi við døgum í bólki 4 t.d. fallið aftur til landið í sambandi við eina tvingsilssølu, so kann hetta loyvið og dagarnir bert bjóðast út, sum eitt loyvi og fiskidagar til fiskiskap í bólki 4. Á henda hátt verður tryggjað, at ásetta lutfallið av samlaða fiskidagatalinum bólkarnar millum, er varðveitt.*

*Stk. 5. Tá loyvi ella dagar verða boðin út, verður gildistíðin á seldu fiskidøgunum og loyvunum tann sama sum á teimum rættindum, sum eru útlutað, t.v.s. 8 ár, har støða á hvørjum ári verður tikin til, um gildistíðin skal leingjast við einum ári, sum ásett í grein 21. Hetta merkir, eins og lýst undir grein 17, stk. 5, at dagar, bodnir út á uppboðssølu, verða viðgjørdir á jøvnum føti við dagarnar tillutaðar í 2019, um talan t.d. seinni verður um at skerja fiskidagatalið."*

§ 8, stk. 1 kann í ein ella annan mun sigast at koma í staðin fyri § 13, stk. 1-3 í løgtingslóg nr. 161 frá 18. desember 2017 um fyrisiting av sjófeingi.

Báðar greinarnar snúgva seg um at áseta skiftisskipanir fyri tey rættindi, ið ikki eru ella verða seld á uppboði, umframt at § 8 eisini ger undantak fyri tilsøgn um menningar-kvotur. Ásetingarnar innihalda tó heilt hvør sína skiftisskipan og hava hvør sítt orðaljóð, har § 8 snýr seg um tilgongdina fram til at hesi rættindi skulu vera knýtt at egnum fiskifari við veiðiloyvi, meðan § 13 í avtiknu lógini bert hevur til endamál at áseta eina skiftisreglu, sum sigur, hvussu skipanin skal halda fram fyri tey rættindi, ið ikki verða seld á uppboði.

§ 8, stk. 1 er soljóðandi:

"*Persónur ella felag, sum í 2019 hevði rætt at fiska av øðrum rættindum enn teimum, ið eru fevnd av §§ 9 og 10, og teimum, ið bert høvdu gildi í 2019, kann við gildiskomu løgtingslógarinnar halda fram og fáa fiskiloyvi til ávíst fiskifar."*

Innleiðandi viðmerkingarnar til § 8 og viðmerkingarnar til § 8, stk. 1 eru soljóðandi:

"*Hendan greinin skipar tillagingartíðina hjá teimum, sum hava onnur rættindi enn 3 ella 8 ára uppboðsrættindi ella tilsøgn um menningarkvotur, tá lógin fær gildi. Hetta fevnir sostatt um meginpartin av teimum veiðirættindum, ið eru undir galdandi lóg um fyrisiting av sjófeingi, og sum halda fram undir nýggju lógini. Grundreglan í hesum lógaruppskoti er, at rættindini at fiska skulu vera knýtt at ávísum fiskifari við veiðiloyvi. Hetta broytir verandi grundreglu, sum sigur, at rættindini eru knýtt at ávísum persóni ella felag.*

*Stk. 1 ásetir, at persónur ella felag, sum í 2019 hava rættindi at fiska og sum, tá hendan lógin fær gildi, framvegis hava hesi rættindi, kunnu halda fram við sínum virksemi frá 1. januar 2020. Undantikin eru rættindi, sum eru keypt sum 3 ella 8 ára rættindi á uppboði undir lógini um fyrisiting av sjófeingi og tilsagnir um menningarkvotur, latnar undir somu lóg. Hesi rættindi eru skipað fyri seg í §§ 9 og 10. Rættindi, sum sambært galdandi lóg bert høvdu gildi í 2019, so sum 1 ára uppboðssølukvotur og kvota latin sum samsýning fyri vísindaligar royndir, geva ikki rætt til fiskiloyvi frá 1. januar 2020."*

§ 13, stk. 1-3, í avtiknu lógini um fyrisiting av sjófeingi, eru soljóðandi:

*"§ 13. Persónur ella felag, sum í 2017 hevur havt loyvi við ávísum fiskifari at taka lut í fiskiskapi eftir uppsjóvarfiski og í fiskiskapi uttan fyri føroyskan sjógv undir skipan við egnum árskvotum, kann við gildiskomu løgtingslógarinnar halda fram og fáa atgongd at veiða av hesum rættindum, ið ikki verða boðin út sambært §§ 14-18. Undantikin er kvota, keypt á uppboði í 2017, og egin árskvota, latin sum samsýning fyri at gera vísindaligar fiskirannsóknir fyri Havstovuna.*
*Stk. 2. Fyri rættindi, ið ikki verða boðin út sambært §§ 14-18, og sum fyri gildiskomu løgtingslógarinnar eru skipað við felagskvotu á øllum leiðum ella felags fiskidøgum uttan fyri føroyskan sjógv, verður fiskiskapurin skipaður eftir nærri ásettum reglum í kunngerð, sambært heimildum í hesi løgtingslóg.*
*Stk. 3. Fyri annan fiskiskap enn tann, ið er fevndur av stk. 1 og 2, og sum ikki er fevndur av §§ 22-27 ella §§ 73 og 74, verður fiskiskapurin skipaður eftir nærri reglum, ásettum í kunngerð sambært heimildunum í hesi løgtingslóg."*

Innleiðandi viðmerkingarnar til § 13, og viðmerkingarnar til § 13, stk. 1-3 í avtiknu lógini eru soljóðandi:

*"Frameftir verður ein partur av føroyskum veiðirættindum boðin út á uppboði. Yvirskipaða ætlanin við hesi lógargrein er at hava eina skiftisreglu, sum sigur, at fyri tey rættindi, ið ikki verða seld á uppboði, heldur skipanin, ið var fyri 1. januar 2018, í høvuðsheitum fram. Tey, ið eru í vinnu, tá lógin fær gildi, kunnu halda fram undir somu skipanarligu kørmum sum frammanundan. Endamálið er meira neyvt at lýsa, hvussu rættindi, sum ikki verða boðin út eftir ásetingunum í lógini, verða latin persónum og feløgum frameftir. Til tess verður m.a. mett neyðugt at gera skilna millum ymiskar skipanir - eginkvota, felagskvotur og aðrar skipanir - og meira neyvt at lýsa, hvussu ymiskar skipanir geva grundarlag fyri rættindum frameftir.*

*Leggjast kann afturat, at fiskidagaskipanin í 2018, og frá og við 1. januar 2019 kvotuskipanin og fiskidagaskipanin í fiskiskapinum eftir botnfiski undir Føroyum eru skipað fyri seg í sjálvari lógini - ávikavist grein 84-91 og grein 22-27 í uppskotinum. Hesi rættindi eru tískil ikki fevnd av hesi grein.*

*Í stk. 1 er ásett, at rættindahavarar, sum undir løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap í 2017, hava havt loyvi at luttaka í fiskiskapi eftir uppsjóvarfiski og í fiskiskapi uttan fyri føroyskan sjógv, skipaður við egnum árskvotum, skulu kunna halda áfram við sínum virksemi. Rættindahavarar varðveita sín lutfalsliga part, sæð í mun til aðrar rættindahavarar, sum eisini hava havt eginkvotu. Samstundis verður tilskilað, at tað eru ávís egin rættindi í 2017, sum ikki geva ein rætt frameftir. Her er talan um tey rættindi, sum í 2017 eru keypt á uppboðssølu sum egnar kvotur, og tey rættindi, sum eigari av fiskifari hevur fingið sum samsýning fyri at gera vísindaligar royndir fyri Havstovuna. Mett verður ikki, at hesi eitt ára rættindi eiga at vera grundarlag undir líknandi rættindum frameftir.*

*Í stk. 2 er ásett, at fyri rættindi, sum hava verið skipað sum felagskvota ella felags fiskidagar uttan fyri føroyskan sjógv, kann landsstýrismaðurin – eins og undir lógini um vinnuligan fiskiskap - skipa fiskiskapin eftir nærri reglum, sum verða ásettar í kunngerð. Heimildirnar at skipa fiskiskapin eru í grein 28 og grein 34 í lógaruppskotinum og eru í høvuðsheitum tær somu, ið eru í gomlu lógini. Tað vil m.a. siga, at karmarnir og fyritreytirnar fyri at skipa fiskiskapin við felagskvotum, eru teir somu sum frammanundan.*

*Í stk. 3 er ásett, at fyri annan fiskiskap enn tann í stk. 1 og 2 nevnda, verður tað eisini frameftir so, at hesin fiskiskapur verður skipaður eftir nærri reglum, ásettum í kunngerð við heimild í lógini. Heimildirnar at skipa fiskiskapin eru í grein 28 og grein 34 í lógaruppskotinum. Vísast kann eisini til heimildirnar, sum landsstýrismaðurin hevur í grein 39."*

Almennu viðmerkingarnar til løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 155 frá 20. desember 2023, innihalda ikki nógva vegleiðing um, hvussu ásetingarnar í §§ 22, stk. 1, 23, stk. 1 og 2, §§ 14-17 og 7-8 skulu tulkast, burtursæð frá, at "*Broytingarnar í lógaruppskotinum eru ætlaðar at geva vinnuni tryggar karmar at virka undir*", sum er tilskila í seinasta brotið í pkt. 1.2., og so fylgjandi brot, sum er at finna á s. 26-27 í uppskotinum:

***"Veiðirættindi -tillaging og skifti frá galdandi lóg***
*Rættindahavarar, sum undir verandi løgtingslóg hava rættindi, ið ikki eru keypt á uppboði ella latin sum menningarkvotur, kunnu halda fram undir at kalla somu kørmum sum fyrr. Allir rættindahavarar fáa eina tíð at laga seg til broyttu fyritreytirnar. Serligar skiftisreglur verða gjørdar fyri rættindi keypt á uppboði í 2018 og 2019 og fyri menningarkvotur, so at hesi, sum frá líður, verða løgd um til rættindi við 12 ára gildistíð.*

*Í verandi lóg er ein meginregla, at rættindahavari sjálvur kann gera av, hvat fyri fiskifar og hvussu nógv fiskifør viðkomandi velur at brúka (undantikið fiskifør í bólki 5 undir fiskidagaskipanini). Farið verður nú frá hesi skipan og aftur til eina skipan, har rættindini verða tengd at ávísum fiskifari, eins og støðan var undir løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.*

*Treytirnar, um at knýta rættindi at ávísum fiskifari, verða tó ikki settar í gildi frá degi til dags, tí fyrilit má takast fyri, at vinnan seinastu tvey árini kann hava innrættað seg og tillagað seg til ein nýggjan veruleika, har møguleikin er fyri at brúka onnur fiskifør enn tey, man sjálvur eigur.*

*Lagt verður tí upp til, at rættindahavarar fáa eina tíð at laga seg til broyttu fyritreytirnar, har serligar skiftisreglur vera galdandi. Skiftisreglurnar eru ymiskar, alt eftir hvør upprunin er hjá rættindunum, sum ein persónur ella felag hevur við sær inn í ta nýggju lógina. Skilt verður ímillum rættin til kvotur, keyptar á uppboði sum 3 og 8 ára rættindi undir løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi; menningarkvotur, sum eru*

*latnar til verkætlanir fyri avmarkað tíðarskeið, og sum framvegis eru í gildi 1. januar 2020; og onnur rættindi, t.e. rættindi til t.d. eginkvotur, rætturin til fiskidagar undir fiskidagaskipanini og rætturin til felags kvotur.*

***Onnur rættindi enn uppboðssølukvotur og menningarkvotur***
*Tey, ið undir verandi lóg hava rættindi, ið ikki eru seld á uppboði ella latin sum menningarkvotur, kunnu í høvuðsheitum halda fram undir somu umsitingarligu og skipanarligu kørmum sum frammanundan. Talan er her um teir rættindahavarar, sum t.d. hava fingið tillutað egnar kvotur og egnar fiskidagar undir løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, ella sum hava rætt til at luttaka í fiskiskapinum eftir felagskvotum ella í øðrum loyvisskipanum.*

*Hesir rættindahavarar kunnu við nýggju lógini halda fram, men skulu, áðrenn 1. januar 2022, hava knýtt síni rættindi at egnum fiskifari.*

*Í tillagingartíðini fram til 1. januar 2022 kann rættindahavarin velja at brúka egin fiskifør, ella fiskifør, sum viðkomandi ikki eigur. Verður fiskiloyvi útskrivað til fiskifar, sum viðkomandi ikki eigur, vera rættindini ikki knýtt at fiskifarinum, og fiskifarið fær ikki veiðiloyvi við støði í hesum rættindum.*

*Velur rættindahavarin at fáa fiskiloyvi útskrivað til egið fiskifar, tá fær fiskifarið veiðiloyvi, um tað ikki longu hevur veiðiloyvi, og rættindini vera knýtt at fiskifarinum. Rættindahavarin er tá eigari av fiskifari við veiðiloyvi og fevndur av ásetingunum í lógini hesum viðvíkjandi. Fram til 1.januar 2022, kann rættindahavarin tó velja, at rættindini frameftir skulu gagnnýtast við fleiri fiskiførum, og í hesum sambandi biðja um, at rættindi, sum eru knýtt at einum fiskifari, skulu knýtast at øðrum fiskifari í staðin.*

*Frá 1. januar 2022 kann rættindahavarin ikki eins og fyrr velja at fáa fleiri fiskifør, ella at flyta rættindi ímillum síni fiskifør. Skulu rættindi eftir tað leggjast á annað fiskifar, skal tað gerast eftir ásetingum um flyting og avhending av veiðirættindum í løgtingslógini."*

Við tað at talan heilt ella lutvíst er um endurtøkur av ásetingum frá løgtingslóg nr. 161 frá 18. desember 2017 um fyrisiting av sjófeingi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 126 frá 5. august 2019, ið varð sett úr gildi við galdandi sjófeingislóg, kunnu almennu viðmerkingarnar til avtiknu lógina eisini innihalda viðkomandi tulkingarískoyti til tær omanfyri endurgivnu ásetingarnar.

Brot úr almennu viðmerkingunum til løgtingsmál nr. 18/2017: Uppskot til løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, sum kunnu hava týdning fyri tulkingina eru hesi:

Undir yvirskriftini "*Atgongd at fiska og útlutingarskipanir*", verður m.a. greitt soleiðis frá, um vit síggja burtur frá teimum brotum, sum bert snúgva seg um fiskiskap eftir botnfiski:

*“Við hesum lógaruppskoti verða broytingar gjørdar í atgongdini at bjóða seg fram at veiða av føroyskum rættindum. Ein partur verður boðin út alment, meðan ein partur verður atkomiligur hjá teimum, ið eru í vinnu, áðrenn lógin fær gildi. Tey, ið eru í vinnu, tá lógin fær gildi, kunnu í høvuðsheitum halda fram undir somu umsitingarligu og skipanarligu kørmum sum frammanundan, og kunnu fiska av teimum rættindum, ið ikki fara á uppboð.”*

*“Fyri annan fiskiskip verður í skiftinum frá gomlu lógini til nýggju lógina gjørdur ávísur skilnaður millum ymiskar skipanir -eginkvota, felagskvotur og aðrar skipanir. Ásett er, hvussu ymiskar skipanir geva grundarlag fyri rættindum.*

*Sum tað fyrsta sigur uppskotið, at rættindahavarar, sum undir lógini um vinnuligan fiskiskap í 2017, hava havt loyvi at luttaka í fiskiskapi eftir uppsjóvarfiski og í fiskiskapi uttan fyri føroyskan sjógv, skipaður við egnum árskvotum, kunna halda áfram við sínum virksemi. Hetta ber í sær, at hesir rættindahavarar varðveita sín lutfalsliga part, sammett við aðrar rættindahavarar, sum eisini hava havt eginkvotu. Tað vil m.a. siga, at karmarnir og fyritreytirnar fyri at skipa fiskiskapin sum egin rættindi, eru so gott sum óbroyttir.*

*Fyri rættindi, sum hava verið skipað sum felagskvota, er lagt upp til, at landsstýris-maðurin kann skipa fiskiskapin eftir nærri reglum, sum verða ásettar í kunngerð. Við hesum eru lógarkarmarnar, fyri at skipa fiskiskapin við felagskvotum, teir somu sum í lógini um vinnuligan fiskiskap.”*

*“Høvuðsbroytingin við hesum lógaruppskotinum er, at ein partur av teimum veiði-rættindum, sum føroyskir myndugleikar hava ræðið á, verður seldur á uppboði. Yvirskipaða endamálið er, at persónar ella feløg, ið lúka ásettu treytirnar um tilknýti til Føroyar, ognarskap o.s.fr., fáa møguleika at bjóða seg fram í fiskiveiðu.*

*Uppskotið leggur upp til, at partur av heildarkvotum av svartkjafti, makreli, norðhavssild, botnfiski í Barentshavinum, toski á Flemish Cap og botnfiski í Eysturgrønlandi altíð verða boðin út.*

*Fyri hesi fiskasløg eru sett nøkur mørk, sum verða brúkt í sambandi við sølu av rættindum:*
*350.000 tons av svartkjafti*
*100.000 tons av makreli*
*70.000 tons av norðhavssild*
*30.000 tons av botnfiski í Barentshavinum*
*3.100 tons av toski á Flemish Cap*
*1.900 tons av botnfiski í Eysturgrønlandi*

*Lagt er upp til, at 25% av heildarkvotuni, upp til omanfyrinevndu mørk, verða boðin út sum sølukvota, ímeðan nøgdin omanfyri, fer heildarkvotan upp um hesi mørk, verður boðin út sum uppboðsárskvota.”*

*"Eins og fyri eitt nú uppsjóvarfiskin er ásett eitt ovara mark, soleiðis at tað ongantíð verður meiri enn 25% av hesari ovaru nøgd, sum verður boðið út sum sølukvota. Tá heildarkvotan fyrstu ferð rakar ovara markið, er ein nøgd samsvarandi við 25% av kvotuni upp til hetta markið, vorðin sølukvota. Sølukvota er partur av heildarkvotu, sum verður seld aftur, tá hon fyrst er seld einaferð. Lækkar heildarkvotan undir markið aftur, verða áhaldandi 25% boðin út sum sølukvota. Verður heildarkvotan hægri enn tilskilaða markið, verður nøgdin omanfyri boðin út sum uppboðsárskvota."*

*"At enda er í lógaruppskotinum heimild at bjóða út nýggj veiðirættindi sum sølukvota. Nýggj rættindi eru m.a. fiskimøguleikar, ið ikki áður hava verið gagnnýttir í føroyskum fiskiskapi ella skipaður í føroyskari lóggávu, øktar kvotur ella nýggj rættindi í sínámillum fiskiveiðiavtalum ella øking í føroyska partinum av rættindum, sambært samtyktum í økisbundnum fiskiveiðifelagsskapum og eftir millumlanda avtalum. Eisini er heimild at bjóða út veiðirættindi, ið falla aftur til landið, t.d. tí tey ikki lúka brúksskylduna í lógini ella í sambandi við tvingsilssølu. Talan kann tá bæði vera um sølukvotu, ella tá talan er um fiskidagaskipanina undir Føroyum, um fiskidagar og loyvi."*

*"Av tí, at talan er um eina nýggja skipan at útluta veiðirættindini eftir, verður mett, at tað tænir yvirskipaðu endamálunum, at eitt ávíst rásarúm er í skipanini, herundir, hvussu nógv skal bjóðast út í senn, hvussu ofta søla skal vera, og hvør søluháttur skal brúkast.*

*Mett verður samanumtikið, at við hesum lógaruppskotinum verða atlit tikin at teimum, sum eru í vinnu, tá lógin kemur í gildi. Tað er bert ein avmarkaður partur av tøkum føroyskum veiðirættindum, ið fer á alment útboð. Verandi rættindahavarar varðveita sín lut í tí partinum av heildarkvotuni, ið ikki verður boðin út. Somuleiðis eru tað ikki øll veiðirættindi, ið fara á alment uppboð, beinanvegin lógin fær gildi."*

Av rættarreglum, sum annars hava týdning fyri hetta málið, eru:

Kunngerð um skipan av fiskiskapinum eftir svartkjafti við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2017, sum seinast broytt við kunngerð nr. 113 frá 24. juli 2017 §§1a–3b undir yvirskriftini "*Heildarkvota og býti av kvotuni*".

§§1a-3b eru soljóðandi:

*"§ 1 a. Føroyska heildarkvotan av svartkjafti í 2017 er 476.901 tons.*
*Stk. 2. Umframt kvotuna í stk. 1 er kvota frá 2016, sum ikki er fiskað í 2016, og sum kann flytast til 2017.*

*§ 2. Av kvotunum, sambært § 1 a, verða 380.401 tons sett av til fiskifør undir føroyskum flaggi at fiska.*

*Stk. 2. Umframt kvotuna sambært stk. 1 er kvota á 9.000 tons av svartkjafti, sum fiskifør undir føroyskum flaggi kunnu fiska í ES sjógvi sambært sínámillum fiskiveiðiavtalu millum Føroyar og ES í 2017.*

*§ 3. 255.807 tons av kvotuni, sambært § 2, stk. 1, og kvotan, sambært § 2, stk. 2, verður latin eigara av fiskifari undir føroyskum flaggi, sum í 2016 hevði rætt til egna árskvotu av svartkjafti, ella fiskifari, sum hesin rættur er fluttur á, undantikið kvota keypt á uppboði. Kvotan verður latin sum egin árskvota.*
*Stk. 2. Hevur fiskifar í 2016 fiskað av kvotu fyri 2017, verður hendan veiðan mótroknað kvotuni hjá fiskifarinum fyri 2017.*

*Stk. 3. Kvota, sambært § 3, stk. 1, kann fiskast í føroyskum sjógvi, íslendskum sjógvi, ES sjógvi og í NEAFC skipanarøkinum. Fiskiskapurin í ES sjógvi av teimum 255.807 tonsunum er avmarkaður til í mesta lagi 21.500 tons. Kvota, sambært § 2, stk. 2, kann bert fiskast í ES sjógvi.*

*§ 3 a. Av kvotuni, sambært § 2, stk. 1, verða 70.000 tons latin sum felags árskvota til fiskifør undir føroyskum flaggi, sum hava veiðiloyvi sambært § 5, stk. 3 í løgtingslógini. Fiskiskapurin kann fara fram í føroyskum sjógvi, íslendskum sjógvi og í NEAFC skipanarøkinum.*

*§ 3 b. Av kvotuni, sambært § 2, stk. 1, verður rætturin at veiða 54.594 tons av svartkjafti seldur á uppboðssølu eftir ásetingunum í § 1 í løgtingslóg um serstakar treytir fyri fiskiskapi eftir makreli, norðhavssild og svartkjafti og botnfiski í Barentshavinum í 2017. Fiskiskapurin eftir hesi kvotu kann fara fram í føroyskum sjógvi, íslendskum sjógvi og í NEAFC skipanarøkinum."*

§ 21 í hesi kunngerðini er soljóðandi: "*Henda kunngerð kemur í gildi 1. januar 2017 og fer úr gildi 31. desember 2017.*"

Felags árskvota av svartkjafti er eisini skipað við § 3a í kunngerð nr. 138 frá 22. desember 2014 um skipan av fiskiskapinum eftir svartkjafti við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2015, sum seinast broytt við kunngerð nr. 117 frá 13. november 2015.

§§1a–3a undir yvirskriftini "*Heildarkvota og býti av kvotuni*" eru soljóðandi:

"*§ 1 a. Føroyska heildarkvotan av svartkjafti í 2015 er 425.000 tons.*

*§ 2. Av kvotuni, sambært § 1 a, verða 343.000 tons sett av til fiskifør undir føroyskum flaggi at fiska.*
*Stk. 2. Umframt ásetingarnar sambært stk. 1 kunnu fiskifør undir føroyskum flaggi í ES sjógvi í 2015 fiska 15.000 tons av svartkjafti.*

*§ 3. 223.000 tons av kvotuni, sambært § 2, stk. 1, og kvotan, sambært § 2, stk. 2, verður latin fiskiførum undir føroyskum flaggi, sum í 2014 høvdu rætt til egna árskvotu av svartkjafti, ella fiskiførum, sum hesin rættur er fluttur á. Fiskiskapurin kann fara fram í føroyskum sjógvi, íslendskum sjógvi, ES sjógvi og í NEAFC-skipanarøkinum. Fiskiskapurin í ES sjógvi av teimum 223.000 tonsunum er avmarkaður til í mesta lagi 35.000 tons. Kvotan verður latin sum egin árskvota.*
*Stk. 2. Hevur fiskifar í 2014 fiskað av kvotu fyri 2015, samsvarandi treytunum í fiskiloyvinum í 2014, verður hendan veiðan mótroknað kvotuni hjá fiskifarinum fyri 2015.*
*Stk. 3. Fiskiførum verður heimilað at veiða av kvotuni fyri 2016 við upp til 10% av egnu árskvotuni fyri 2015. Veiða, sum er fiskað sambært 1. pkt., verður mótroknað tillutaðu kvotuni hjá fiskifarinum fyri 2016.*
*Stk. 4. Ásetingarnar í stk. 2 og 3 fevna ikki um kvotuna sambært § 2, stk. 2.*

*§ 3 a. Av kvotuni, sambært § 2, stk. 1, verða 120.000 tons latin sum felags árskvota til fiskifør undir føroyskum flaggi, sum hava veiðiloyvi sambært § 5, stk. 3 í løgtingslógini. Fiskiskapurin kann fara fram í føroyskum sjógvi, íslendskum sjógvi og í NEAFC-skipanarøkinum."*

§ 17 í hesi kunngerðini er soljóðandi: "*Henda kunngerð kemur í gildi 1. januar 2015 og fer úr gildi 31. desember 2015."*

At enda er so kunngerðin, sum fyriliggjandi mál snýr seg um, t.e. kunngerð nr. 180 frá 22. desember 2023 um at skipa fiskiskapin eftir svartkjafti við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2024, sum broytt við kunngerð nr. 26 frá 24. apríl 2024, har §§2–8a undir yvirskriftini "*Føroysk kvota og býti av kvotuni*" eru soljóðandi:

*"§ 2. Føroyska kvotan av svartkjafti í 2024 er sett til 543.483 tons.*
*Stk. 2. Afturat kvotuni í stk. 1 verða 2.400 tons av svartkjafti, ið ikki vórðu fiskað í 2023, flutt til at verða fiskað í 2024.*

*§ 3. Av kvotuni sambært § 2 verða 447.983 tons sett av til fiskifør undir føroyskum flaggi at fiska.*
*Stk. 2. Heildarkvotan av svartkjafti í 2024 er 394.787 tons.*

*§ 4. 263.490 tons av kvotuni sambært § 3, stk. 1 verða latin eigarum av fiskiførum, sum í 2023 høvdu rætt til egna árskvotu av svartkjafti, ella teimum, sum hesin rættur er fluttur til, undantikin kvota keypt á uppboði og kvotur umlagdar sambært § 10, stk. 3 ella § 49, stk. 4 í løgtingslógini. Fiskiskapurin verður skipaður við egnari árskvotu.*
*Stk. 2. Eigari av ávísum fiskifari kann sambært § 34, stk. 4, 1. pkt. í løgtingslógini flyta kvotu, sum ikki er fiskað í 2024, til 2025, tó í mesta lagi eina nøgd, ið samsvarar við 10% av egnari árskvotu í 2024.*
*Stk. 3. Eigari av ávísum fiskifari kann sambært § 34, stk. 4, 1. pkt. í løgtingslógini fiska upp um egnu árskvotuna í 2024, tó í mesta lagi við eini nøgd, ið samsvarar við 10% av*

*egnari árskvotu í 2024. Ov nógv fiskað í 2024 verður sambært § 34, stk. 4, 2. pkt. í løgtingslógini mótroknað av tillutaðari eginkvotu í 2025.*
*Stk. 4. Tey 263.490 tonsini sambært stk. 1 kunnu fiskast í føroyskum sjógvi, í íslendskum sjógvi og í NEAFC-skipanarøkinum.*

*§ 5. Av kvotuni sambært § 3, stk. 1 verða 7.000 tons sett av til vinnuligar fiskiroyndir samsvarandi § 11. Kvotan kann fiskast í føroyskum sjógvi, í íslendskum sjógvi og í NEAFC-skipanarøkinum.*

*§ 6. Av kvotuni sambært § 3, stk. 1 verða 40.268 tons sett av til rættindi keypt á uppboðssølu eftir ásetingunum í løgtingslóg nr. 161 frá 18. desember 2017 um fyrisiting av sjófeingi, íroknað tær nøgdir, sum eru lagdar um til egnar árskvotur sambært § 9 í løgtingslógini. Fiskiskapur eftir hesi kvotu kann fara fram í føroyskum sjógvi, í íslendskum sjógvi og í NEAFC-skipanarøkinum.*
*Stk. 2. Persónur, felag ella eigari av ávísum fiskifari, sum í 2024 hevur rættindi at fiska svartkjaft, keypt á uppboði, kann flyta upp til 10% av uppboðskvotuni í 2024 til at verða fiskað í 2025.*
*Stk. 3. Eigari av fiskifari við kvotu av nøgdini í stk. 1, har gildistíðarskeiðið er runnið, og kvotan er útlutað sum egin árskvota, kann sambært § 34, stk. 4, 1. pkt. í løgtingslógini fiska upp um egnu árskvotuna í 2024, tó í mesta lagi eina nøgd, ið samsvarar við 10% av egnu árskvotuni í 2024. Ov nógv fiskað í 2024 verður sambært § 34, stk. 4, 2. pkt. í løgtingslógini mótroknað av egnari árskvotu í 2025.*

*§ 7. Av kvotuni sambært § 3, stk. 1 verða 46.196 tons sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir samsvarandi § 14 í løgtingslógini. Menningarkvotur, sum eru lagdar um til egnar árskvotur sambært § 10, stk. 3 í løgtingslógini, verða roknaðar av hesi nøgdini. Kvotan kann fiskast í føroyskum sjógvi, í íslendskum sjógvi og í NEAFC-skipanarøkinum.*
*Stk. 2. Eigari av ávísum fiskifari, sum hevur kvotu eftir stk. 1, kann sambært § 34, stk. 4, 1. pkt. í løgtingslógini flyta kvotu, sum ikki er fiskað í 2024, til 2025, tó í mesta lagi eina nøgd, ið samsvarar við 10% av egnari árskvotu í 2024.*
*Stk. 3. Eigari av ávísum fiskifari, sum hevur kvotu eftir stk. 1, kann sambært § 34, stk. 4, 1. pkt. í løgtingslógini fiska upp um egnu árskvotuna í 2024, tó í mesta lagi við eini nøgd, ið samsvarar við 10% av egnari árskvotu í 2024. Ov nógv fiskað í 2024 verður sambært § 34, stk. 4, 2. pkt. í løgtingslógini mótroknað av tillutaðari eginkvotu í 2025.*

*§ 8. Av kvotuni sambært § 3, stk. 2 verða 58.428 tons sett av til vinnuligar royndir og verkætlanir samsvarandi § 16, stk. 2 í løgtingslógini. Kvotan kann fiskast í føroyskum sjógvi, í íslendskum sjógvi og í NEAFC-skipanarøkinum.*
*Stk. 2. Eigari av ávísum fiskifari, sum hevur kvotu av nøgdini í stk. 1, og sum er løgd um til egna árskvotu sambært § 49, stk. 4 í løgtingslógini, kann sambært § 34, stk. 4, 1. pkt. í løgtingslógini flyta kvotu, sum ikki er fiskað í 2024 til 2025, tó í mesta lagi eina nøgd, ið samsvarar við 10% av egnu árskvotuni í 2024.*
*Stk. 3. Eigari av ávísum fiskifari, sum hevur kvotu av nøgdini í stk. 1, og sum er løgd um til egna árskvotu sambært § 49, stk. 4 í løgtingslógini, kann sambært § 34, stk. 4, 1. pkt. í løgtingslógini fiska upp um egnu árskvotuna í 2024, tó í mesta lagi eina nøgd,*

*ið samsvarar við 10% av egnu árskvotuni í 2024. Ov nógv fiskað í 2024 verður sambært § 34, stk. 4, 2. pkt. í løgtingslógini mótroknað av egnari árskvotu í 2025.*

*§ 8 a. Í 2024 verða 35.000 tons av svartkjafti latin sum felagskvota við hámarki til eigarar av fiskiførum undir føroyskum flaggi, sum við fiskiársbyrjan í 2024 hava rætt at fiska svartkjaft. Hámarkið hjá hvørjum fiskifari er 2.500 tons. Fiskiskapurin kann fara fram í føroyskum sjógvi, íslendskum sjógvi og í NEAFC-skipanarøkinum.*
*Stk. 2. Fiskifør, sum bara hava tillutaða kvotu, latin til vinnuligar royndir og verkætlanir á landi sambært § 4 í kunngerð um kvotur av makreli, norðhavssild og svartkjafti til vinnuligar royndir og verkætlanir, fáa ikki lut í kvotuni sambært stk.1.*
*Stk. 3. Fyri at fáa fiskiloyvi sambært stk. 1, skal egin árskvota, tillutað í 2024 sambært § 4 ella kvota av nøgdunum í §§ 6-8 vera fiskað, samanber tó stk. 2. Somuleiðis skal flutt restkvota frá 2023 til 2024 og avhend kvota í 2024 vera fiskað.*
*Stk. 4. Eru líkindi fyri, at kvotan í stk. 1 ikki verður fullnýtt, kann landsstýrismaðurin broyta ella taka burtur hámarkið."*

Løgtingslóg um ábyrgd landsstýrisins, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021 § 2, ásetir at: "*Løgmaður og landsstýrismenn hava ábyrgd av fyrisitingini av teim málsøkjum, sum løgd eru til teirra."*

§ 5 í lógini um ábyrgd landsstýrisins, er soljóðandi:
"*§ 5. Løgmaður ella landsstýrismaður verður revsaður, um hann tilætlað ella av grovum ósketni skúgvar til viks tær skyldur, sum liggja á honum sambært løgtingslóg um stýrisskipan Føroya ella lóggávuni annars ella starvsinnihaldi hansara.*
*Stk. 2. Ásetanin í stk. 1 er eisini galdandi, um so er, at løgmaður ella landsstýrismaður gevur løgtinginum skeivar ella villleiðandi upplýsingar, ella um hann, tá løgtingið viðger eitt mál, tigur við upplýsingum, sum eru av stórum týdningi fyri tingsins meting av málinum."*

## Samanburður millum lóggávu og faktiskar umstøðurnar

Løgtingið gjørdi í 2007 av at broyta ta tá galdandi lógina um vinnuligan fiskiskap, so at einki veiðiloyvi og fiskiloyvi hevði gildi longri enn til 1. januar 2018.

Løgtingslóg nr. 161 frá 18. desember 2017 um fyrisiting av sjófeingi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 126 frá 5. august 2019, ásetti eina skipan, sum niður í minsta smálut tók støðu til, í hvønn mun tey, sum í 2017 høvdu rætt til at taka lut í fiskiskapi eftir uppsjóvarfiski og í fiskiskapi uttan fyri føroyskan sjógv undir skipan við egnum árskvotum, kundi halda fram og fáa atgongd at veiða av hesum rættindum, og í hvønn mun hesi rættindi kundu verða skerd.

Lógin um fyrisiting av sjófeingi, ið kom í gildi 1. januar 2018, ásetti sostatt nýggja gildistíð og nýggjar lógarkarmar fyri hesi veiðurættindi.

Gildistíðin fyri rættindi, sum varð ásett í § 21, stk. 1, í avtiknu lógini um sjófeingi, varð ikki galdandi fyri rættindi sambært §§ 14-16, § 17, stk. 1 og 2, § 18, stk. 1 og stk. 3, 1. pkt., §§ 58-61 og §§ 73 og 74. Burtursæð frá hesum undantøkum varð gildistíðin ásett til 8 ár, sum nú er longt til 12 ár.

Tá løgtingið samtykti galdandi løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi, sum kom í gildi 1. januar 2020, og samstundis setti úr gildi løgtingslóg nr. 161 frá 18. desember 2017 um fyrisiting av sjófeingi, vórðu stig ikki tikin til at seta úr gildi tey rættindi, sum vórðu givin við lógini um fyrisiting av sjófeingi.

Í gildistíðarskeiðinum kunnu ásetingarnar, sum vóru settar í gildi tann 1. januar 2018, tí hava týdning fyri tulkingina av galdandi sjófeingislóg.

Útgangsstøðið, sum varð ásett í § 13 í avtiknu lógini um fyrisiting av sjófeingi, tilskilar, at persónur ella felag, sum í 2017 hevur havt loyvi við ávísum fiskifari at taka lut í fiskiskapi eftir uppsjóvarfiski og í fiskiskapi uttan fyri føroyskan sjógv undir skipan við egnum árskvotum, kann við gildiskomu løgtingslógarinnar halda fram og fáa atgongd at veiða av hesum rættindum, ið ikki verða boðin út sambært §§ 14-18.

Í § 21, stk. 2 í avtiknu lógini um fyrisiting av sjófeingi er tó ásett, at hóast latin søgulig rættindi kann Løgtingið, uttan endurgjald, á hvørjum ári ráða yvir upp til 3% av útlutaðum søguligum rættindum undantiknar kvotur, ið eru bjóðaðar út á uppboðssølu.

Við tí skipan, sum varð ásett við lógini um fyrisiting av sjófeingi, bar sostatt til heilt greitt at staðfesta, nær ávikavist landsstýrismaðurin, antin við kunngerð ella sum fyrisitingarmyndugleiki, við útgangsstøði í §§ 14-18, ella løgtingið við lóg, við útgangsstøði í § 21, stk. 2, kundi gera inntriv í søgulig rættindi, og nær slík inntriv vildi hava við sær krav um endurgjald.

Verandi lóg er ikki eins greið.

§ 13, stk. 2 og 3, í avtiknu lógini um fyrisiting av sjófeingi, vóru soljóðandi:

*"Stk. 2. Fyri rættindi, ið ikki verða boðin út sambært §§ 14-18, og sum fyri gildiskomu løgtingslógarinnar eru skipað við felagskvotu á øllum leiðum ella felags fiskidøgum uttan fyri føroyskan sjógv, verður fiskiskapurin skipaður eftir nærri ásettum reglum í kunngerð, sambært heimildum í hesi løgtingslóg.*
*Stk. 3. Fyri annan fiskiskap enn tann, ið er fevndur av stk. 1 og 2, og sum ikki er fevndur av §§ 22-27 ella §§ 73 og 74, verður fiskiskapurin skipaður eftir nærri reglum, ásettum í kunngerð sambært heimildunum í hesi løgtingslóg."*

Kunngerðarheimildirnar í § 13, stk. 2 og 3 í avtiknu lógini um fyrisiting av sjófeingi eru ikki endurtiknar í § 8 í núgaldandi lógini, og hvørgan almennu viðmerkingar til galdandi sjófeingislóg ella ítøkiligu viðmerkingarnar til §§ 22 og 23 í galdandi lóg siga nakað um, hvørt kunngerðarheimildirnar í §§ 22 og 23 í galdandi lóg hervið, uttan nærri tilskilan,

eru ætlaðar eisini at fevna um tær heimildir, sum landsstýrismaðurin frammanundan hevði við § 13, stk. 2 og 3 í avtiknu lógini.

Viðmerkingarnar til § 13, stk. 2 og 3 í avtiknu lógini um fyrisiting av sjófeingi vísa tó greitt til heimildirnar í §§ 28 og 34 í lógini (sum svara til §§ 22 og 23 í galdandi lóg), sum eisini sampakkar væl við orðaljóðið, har kunngerðarheimildirnar í bæði stk. 2 og 3, enda við orðunum "*sambært heimildum í hesi løgtingslóg*".

Tá hetta er sagt, so stendur spurningurin tó eftir, hvat man kann leggja í hetta, tá viðmerkingarnar til § 13, stk. 2 eisini greitt tilskila, "*fyri rættindi, sum hava verið skipað sum felagskvota ella felags fiskidagar uttan fyri føroyskan sjógv*" at "*karmarnir og fyritreytirnar fyri at skipa fiskiskapin við felagskvotum, eru teir somu sum frammanundan*".

Sambært orðaljóðinum til ásetingina í § 13, stk. 2 í avtiknu lógini um fyrisiting av sjófeingi er kunngerðarheimildin galdandi "*Fyri rættindi, ið ikki verða boðin út sambært §§ 14-18, og sum fyri gildiskomu løgtingslógarinnar eru skipað við felagskvotu á øllum leiðum ella felags fiskidøgum uttan fyri føroyskan sjógv*".

Spurningurin er sostatt, um hetta øvugt skal skiljast soleiðis, at landsstýrismaðurin ikki kann skipa fiskiskapin við felagskvotum fyri rættindi, sum ikki "*fyri gildiskomu løgtingslógarinnar eru skipað við felagskvotu á øllum leiðum*".

Almennu viðmerkingarnar til avtiknu lógina um fyrisiting av sjófeingi siga á leið tað sama um hendan spurningin sum ítøkiligu viðmerkingarnar til § 13, stk. 2 og koma ikki nærri inn á, um § 13, stk. 2 kann skiljast soleiðis, at fyri rættindi, sum, tá lógin kom í gildi, *ikki* vóru skipað sum felagskvota ella felags fiskidagar uttan fyri føroyskan sjógv á øllum leiðum, at karmarnir og fyritreytirnar fyri at skipa fiskiskapin við felagskvotum, so heldur ikki eru teir somu sum frammanundan.

Staðfestast kann, at 70.000 tons eru latin sum felags árskvota við § 3a í kunngerð nr. 137 frá 22. desember 2016 um skipan av fiskiskapinum eftir svartkjafti við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2017, sum seinast broytt við kunngerð nr. 113 frá 24. juli 2017, har "*Fiskiskapurin kann fara fram í føroyskum sjógvi, íslendskum sjógvi og í NEAFC skipanarøkinum.*"

Talan er sostatt ikki um at skipa fiskiskap við felagskvotu "*á øllum leiðum*".

Kunngerðin fór eisini út gildi 31. desember 2017, sum er dagin fyri gildiskomu av lógini um fyrisiting av sjófeingi.

Ein líknandi kunngerð varð í gildi frá 1. januar 2015 til 31. desember 2015.

Um § 13, stk. 2 skuldi skiljast soleiðis, at hon avmarkaði heimildirnar hjá landsstýrismanninum sambært §§ 28 og 34 í lógini (sum svara til §§ 22 og 23 í

galdandi lóg), er spurningurin, um hendan avmarkingin er ætla at fella burtur, tá § 13, stk. 2 ikki verður endurtikin í galdandi lóg um sjófeingi?

Hvørgan almennu viðmerkingar til galdandi sjófeingislóg, ella ítøkiligu viðmerkingarnar til §§ 22 og 23 í galdandi lóg, svara hesum spurningi beinleiðis, tó at viðmerkingarnar til § 23, stk. 2 - sum í stóran mun eru tær somu sum viðmerkingarnar til § 34, stk. 2 í avtiknu lógini - tilskila, at:

*"Tá gerast skal av, hvussu rættindi skulu útlutast og býtast millum fiskifør, er søguligur fiskiskapur ofta tað, ið telur mest, t.v.s., at hugt verður at, hvussu fiskiskapurin søguliga hevur verið, hvørji skip hava fiskað, og hvussu nógv tey hava fiskað.*

*Fyritreytirnar kunnu vera ymiskar. Til dømis kann vera talan um at umskipa fiskiskap frá felagskvotu, sum hevur verið í skipanini í nøkur ár, til egnar kvotur. Her er høvuðsfyrilitið oftast "søguligur fiskiskapur", sum er eitt vanligt og góðtikið metingarstøði, tá býtast skal.*

*Í øðrum førum er talan um kvoturættindi, sum eru nýggj, t.e. rættindi, ið ikki áður hava verið tøk hjá føroyskum skipum. Í slíkum førum er støðan vanliga, at einki skip ella skipabólkur kann vísa til meira søgulig rættindi enn nakar annar bólkur."*

Hóast almennu viðmerkingarnar koma inn á spurningin um felagskvotur, so koma tær tó ikki við eini ítøkiligari leiðbeining um, hvørjar heimildir landsstýrismaðurin hevur at skipa fiskiskap við felagskvotu.

Ásetingin um nýggj rættindi, sum varð at finna í § 18 í avtiknu lógini um fyrisiting av sjófeingi, er heldur ikki endurtikin í núgaldandi lóg um sjófeingi, og almennu viðmerkingarnar til galdandi lóg siga einki ítøkiligt um, hvørjar reglur lóggevari so hevur hugsað skulu verða galdandi fyri nýggj rættindi.

Sambært § 18, stk. 2 vóru sum nýggj rættindi eisini at skilja "*øktar kvotur ella nýggj rættindi, sammett við kvoturnar 2018, sambært sínámillum fiskiveiðiavtalum ella øking í føroyska partinum av mest loyvdu veiðu fyri fiskiskap, sambært samtyktum í økisbundnum fiskiveiðifelagsskapum og eftir millumlanda avtalum."*

Viðmerkingarnar til § 18, stk. 2 tilskila, at: "*Talan er eisini um nýggj rættindi, tá øktar kvotur ella nýggj rættindi verða avtalaðar við onnur lond, ella tá føroyski luturin av mest loyvdu veiðu økist í samráðingum við onnur lond, ella at Føroyar einsæris seta sær størri lut. Rættindi, sum longu eru skipað í grein 15, eru undantikin. Ein øking í føroyska lutinum í kongafiskakvotuni í Irmingerhavinum er sostatt at skilja sum nýggj kvota, sum heimild er at bjóða út sambært hesi grein. Til samanberingar skal ein øking í lutfallinum av føroysku kvotuni av t.d. makreli ella svartkjafti viðgerast sambært grein 15."*

18, stk. 1 tilskilar, at: *"Nýggj rættindi at veiða kunnu verða boðin út á uppboði sum sølukvota."* Sambært stk. 3 er tað sama galdandi fyri rættindi, sum falla aftur til landið.

Heimildin í § 18, stk. 1 sæst ikki at verða brúkt við atliti til svartkjaft - har talan heldur ikki hevur verið um øktar kvotur sammet við kvoturnar 2018 - í tíðarskeiðinum fram til, at lógin um fyrisiting av sjófeingi varð avtikin.

Sambært viðmerkingunum til § 18, stk. 2 er eisini tilskilað, at rættindi, sum longu eru skipað í grein 15, eru undantikin, og at ein øking í lutfallinum av føroysku kvotuni av t.d. makreli ella svartkjafti skal viðgerast sambært grein 15. Talan er her um § 15 í avtiknu lógini um fyrisiting av sjófeingi, sum fevndi um sølukvotur av m.a. svartkjafti.

Hesar viðmerkingarnar geva eina ábending um, at ásetingarnar um sølukvotur vóru ætlaðar at innihalda úttømandi ásetingar um, hvussu føroyska kvotan av teimum rættindum, sum vóru skipað við neyvari áseting í § 15 - herundir ávikavist svartkjaftur, norðhavssild og makrelur - skuldi verða býtt, og har ásetingar í kunngerð sambært §§ 28 og 34 í lógini (sum svara til §§ 22 og 23 í galdandi lóg) tí bert kundu skipast innan karmarnar í grein 15, og har landsstýrismaðurin sostatt ikki kundi gera nakrar broytingar í býtinum.

Hetta verður eisini stuðlað av fylgjandi brotið úr almennu viðmerkingunum til avtiknu lógina um fyrisiting av sjófeing, s. 42, 4. reglubrot:

*"Mett verður samanumtikið, at við hesum lógaruppskotinum verða atlit tikin at teimum, sum eru í vinnu, tá lógin kemur í gildi. Tað er bert ein avmarkaður partur av tøkum føroyskum veiðirættindum, ið fer á alment útboð. Verandi rættindahavarar varðveita sín lut í tí partinum av heildarkvotuni, ið ikki verður boðin út. Somuleiðis eru tað ikki øll veiðirættindi, ið fara á alment uppboð, beinanvegin lógin fær gildi."*

Hvørgan almennu viðmerkingar til galdandi sjófeingislóg, ella ítøkiligu viðmerkingarnar til §§ 22 og 23 í galdandi lóg, svara spurninginum, hvønn týdning tað skal hava, tá § 18 ikki er endurtikin í galdandi lóg um sjófeingi.

Um § 18 í ein ella annan mun varð ætlað at avmarkað heimildirnar hjá landsstýris-manninum sambært §§ 28 og 34 í lógini (sum svara til §§ 22 og 23 í galdandi lóg), er spurningurin sostatt, um hendan avmarkingin er ætlað at fella burtur, tá § 18 ikki verður endurtikin í galdandi lóg um sjófeingi?

Ásetingin í § 21, stk. 2, sum tilskilar, í hvønn mun Løgtingið, uttan endurgjald, kann ráða yvir útlutaðum søguligum rættindum, er heldur ikki endurtikin í núgaldandi lóg um sjófeingi, og almennu viðmerkingarnar til galdandi lóg siga einki ítøkiligt um, hvørji rættindi lóggevari so metir seg hava at ráða yvir útlutaðum søguligum rættindum. Við tað at kæran bert snýr seg um heimildirnar hjá landsstýrismanninum, er tó ikki orsøk at koma nærri inn á hetta ivamálið í fyriliggjandi uppriti.

Við tilvísing til omanfyrinevndu ivamál so kunnu kunngerðarheimildirnar í §§ 22 og 23 ikki sigast at verða heilt greiðar, tá tað kemur til spurningin um, hvørt heimildirnar fevna um skipan av felagskvotum og um nýggj rættindi.

Felagskvoturnar, sum vóru ásettar við kunngerðunum um skipan av fiskiskapinum eftir svartkjafti við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2015 og 2017, eru tí eisini ivasamar at brúka sum fordømi, við tað at lógarkarmarnar, út frá eini heildarmeting, ikki eru teir somu.

Ein annar spurningur er, hvørt §§ 14-17 í galdandi sjófeingislóg kunnu sigast at innihalda úttømandi ásetingar um, hvørja mongd av tøku føroysku kvotunum av m.a. svartkjafti kunnu verða settar av til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49, herundir menningarkvotur latnar sambært § 60 í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, og umlagdar kvotur sambært § 14, stk. 1, 3. pkt. og § 15, stk. 3, ella til royndarfiskiskap o.a. sambært § 50?

Tá Kap 4 í lógini um sjófeingi ikki hevur nakra kunngerðarheimild, sum ásetir, at landsstýrismanninum kann broyta tær í kap. 4 ásettu nøgdirnar til vinnuligar royndir og verkætlanir, herundir menningarkvotur latnar sambært § 60 í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, og umlagdar kvotur sambært § 14, stk. 1, 3. pkt. og § 15, stk. 3, ella til royndarfiskiskap o.a. sambært § 50, nøgdir sum annars eru sera neyvt ásettar í lógini, er tað sera ivasamt, um landsstýrismaðurin í staðin kann finna heimildargrundarlag í §§ 22 og 23 at broyta hesar nøgdir við kunngerð.

Yvirskipaðu viðmerkingarnar til kap. 4 í broytingaruppskotinum hjá minnilutanum (samgonguumboðunum) í vinnunevndini benda eisini á, at heimildirnar hjá landsstýris-manninum sambært §§ 22 og 23 í galdandi lóg skulu verða avmarkaðar, tá tað snýr seg um tey rættindi, sum eru fevnd av kap. 4 í lógini.

Viðmerkingarnar eru soljóðandi:

"*Lagt verður við hesum broytingum upp til, at ætlaða sølan av rættindum í 2020 verður slept. Ístaðin verður tann nøgd, sum ætlandi skuldi bjóðast út sum ávikavist sølukvota og uppboðsárskvota, latin til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49. Kapittul 4 verður við hesum broytingaruppskoti ikki longur ein kapittul um uppboðssølu í 2020, men um tær kvotur, sum sambært lógini á ymiskan hátt skulu og kunna verða settar av til vinnuligar royndir og verkætlanir. Heitið verður tí broytt.*"

Dentur er sostatt lagdur á, at talan er um kvotur, sum bæði skulu og kunnu verða settar av til vinnuligar royndir og verkætlanir.

Hóast viðmerkingarnar til galdandi lóg §§ 14 til 16 í tilknýti til nøkur roknidømi tilskila, at "*Restin av kvotuni undir markinum verður útlutað øðrum rættindahavarum, sum undir løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi hava fingið útlutað kvotur av hesum fiskasløgum.*", so kann hetta hinvegin ikki í sær sjálvum sigast at verða nóg greitt til, at

tað kann takast sum ein staðfesting av, at býti, sum ikki fer til tey í roknidøminum annars ásettu endamálini, skal býtast til tey, sum hava søgulig rættindi. Roknidømini eru sett upp eftir nøkrum givnum fortreytum, men uttan at tey siga nakað um framtíðina, har fortreytirnar kunnu verða broyttar.

Her kann tó verða lagt til merkis, at í viðmerkingunum til § 15 í avtiknu lógini um fyrisiting av sjófeingi eru rættindi hjá verandi rættindahavarum útgreinað neyvari.

Spurningur kann somuleiðis setast við, um § 9 ikki inniheldur úttømandi ásetingar um, hvørja mongd av tøku føroysku kvotunum av m.a. svartkjafti skulu fara til rættindi keypt á uppboði í 2018 og 2019?

Viðmerkingarnar hjá minnilutanum (samgonguumboðunum) í vinnunevndini til samtykta broytingaruppskotið til § 15, stk. 1 áseta m.a., at:

"*Nøgdirnar í stk. 1 fyri svartkjaft og norðhavssild samsvara við tær nøgdir, sum sambært galdandi lóggávu høvdu verið bodnar út sum sølukvotur í 2020 (tó frádrigið tað nøgd, sum longu er seld sum 3 og 8 ára rættindi).*"

Hendan viðmerking má síggjast í ljósinum av ásetingini í § 9, stk. 1 í galdandi sjófeingislóg, ið viðvíkur 3 ella 8 ára rættindi keypt á uppboði í 2018 og 2019, og sum í 1. pkt. ásetir, at nøgd rættindahavarans verður "*tilluta eftir mørkunum í § 15, stk. 1.*", umframt § 9, stk. 1, 4. pkt., sum ásetir, at "*Rættindi til svartkjaft, makrel og norðhavssild fylgja lutfalsliga vøkstrinum og niðurskurðinum í heildarkvotuni, eins og kvotur í § 15, stk. 1.*"

Tá § 9 í lógini um sjófeingi heldur ikki hevur nakra kunngerðarheimild, sum ásetir, at landsstýrismanninum kann broyta tær í § 9 ásettu nøgdirnar til rættindi keypt á uppboði í 2018 og 2019, og sum eisini eru sera neyvt ásettar í lógini, er sostatt, eins og viðvíkjandi §§ 14-16, sera ivasamt, um landsstýrismaðurin í staðin kann finna heimildargrundarlag í §§ 22 og 23 at broyta hesar nøgdir við kunngerð.

Løgtingið má tí sigast at hava gjørt av, hvørjar nøgdir av m.a. svartkjafti skulu fara til ávikavist vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49, herundir menningarkvotur latnar sambært § 60 í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, og umlagdar kvotur sambært § 14, stk. 1, 3. pkt. og § 15, stk. 3, til royndarfiskiskap o.a. sambært § 50, og til rættindi keypt á uppboði í 2018 og 2019, og hvussu hesar nøgdir broytast við broytingum í heildarkvotuni.

Kaga vit í kunngerðina nr. 180 frá 22. desember 2023 um at skipa fiskiskapin eftir svartkjafti við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2024, sum varð broytt við kunngerð nr. 26 frá 24. apríl 2024 - har ásetingin um felagskvotu varð sett inn - so kunnu vit staðfesta, at tey 35.000 tonsini av svartkjafti, ið vóru latin sum felagskvota við hámarki vóru "*til eigarar av fiskiførum undir føroyskum flaggi, sum við fiskiársbyrjan í 2024 hava rætt at fiska svartkjaft*".

Hvørji tey fiskiførini undir føroyskum flaggi eru, ið hava rætt til at fiska svartkjaft við fiskiársbyrjan í 2024, verður ásett við somu kunngerð §§ 4-8, har kvota sambært § 4 verður latin "*eigarum av fiskiførum, sum í 2023 høvdu rætt til egna árskvotu av svartkjafti, ella teimum, sum hesin rættur er fluttur til, undantikin kvota keypt á uppboði og kvotur umlagdar sambært § 10, stk. 3 ella § 49, stk. 4 í løgtingslógini*", *kvota sambært § 5* verður latin til "vinnuligar fiskiroyndir", *kvota sambært § 6* verður latin við tilvísing til § 9 í lógini, kvota sambært § 7 verður latin við tilvísing til § 14 í lógini, og kvota sambært § 8 verður latin við tilvísing til § 16, stk. 2 í lógini.

Felagskvotan, sum varð ásett við kunngerð nr. 26 frá 24. apríl 2024 um broyting í kunngerð nr. 180 frá 22. desember 2023 um at skipa fiskiskapin eftir svartkjafti við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2024, hevur sostatt við sær, at nøgdirnar av svartkjafti, ið annars verða lætnar sambært §§ 14-16 og § 9 í lógini, verða øktar.

## Fyribilsniðurstøða í spurninginum um, hvørt undirritaða heldur, at Dennis Holm landsstýrismaður hevur framt brot á almenna rættarliga lóggávu

Tað er eitt krav, at ein fyrisitingarmyndugleiki í sínum avgerðum og reglugerðum skal kunna løgmæta ("legitimera") seg við eini greiðari tilvísing til eina formliga lógarheimild, sum liggur til grund fyri ásetingum av givnum reglum í kunngerð.

Hetta er serliga galdandi, tá talan er um reglur, sum beinleiðis og í týðandi mun gera seg inn á rættarstøðuna hjá borgarum.

Jú størri inntriv ein rættarregla ger í týðandi rættindi hjá borgarum, herundir frælsis- og ognarrættindi, jú ivaleysari má heimildin verða.

Í mínum samanburði millum lóggávu og faktiskar umstøðurnar í málinum eri eg komin fram til, at:

- Kunngerðarheimildirnar í §§ 22 og 23 ikki eru heilt greiðar, tá tað kemur til spurningin um, hvørt heimildirnar fevna um skipan av felagskvotum og um nýggj rættindi.

- Løgtingið hevur gjørt av, hvørjar nøgdir av m.a. svartkjafti skulu fara til ávikavist vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49, herundir menningarkvotur latnar sambært § 60 í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, og umlagdar kvotur sambært § 14, stk. 1, 3. pkt. og § 15, stk. 3, til royndarfiskiskap o.a. sambært § 50, og til rættindi keypt á uppboði í 2018 og 2019, og hvussu hesar nøgdir broytast við broytingum í heildarkvotuni.

- Felagskvotan, sum varð ásett við kunngerð nr. 26 frá 24. apríl 2024 um broyting í kunngerð nr. 180 frá 22. desember 2023 um at skipa fiskiskapin eftir svartkjafti við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2024, hevur við sær, at nøgdirnar av svartkjafti, ið annars verða lætnar sambært §§ 14-16 og § 9 í lógini, verða øktar.

Út frá hesum staðfestingum eri eg komin fram til ta fyribilsniðurstøðu, at § 8a í kunngerð nr. 26 frá 24. apríl 2024 ikki hevur neyðuga lógarheimild.

Við hesi fyribilsniðurstøðu havi eg ikki sæð orsøk til at fara nærri inn í eina viðgerð av spurninginum um møgulig inntriv í søgulig rættindi ella ognartøku.

Viðvíkjandi spurninginum um ábyrgdina hjá Dennis Holm, landsstýrismanni, so ásetir løgtingslóg um ábyrgd landsstýrisins, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021 § 2, at: "*Løgmaður og landsstýrismenn hava ábyrgd av fyrisitingini av teim málsøkjum, sum løgd eru til teirra.*"

Sambært § 5 í lógini um ábyrgd landsstýrisins er ásett, at "*Løgmaður ella landsstýrismaður verður revsaður, um hann tilætlað ella av grovum ósketni skúgvar til viks tær skyldur, sum liggja á honum sambært løgtingslóg um stýrisskipan Føroya ella lóggávuni annars ella starvsinnihaldi hansara.*"

Ein niðurstøða um, at lógin er brotin sostatt ikki av sær sjálvum er ein staðfesting av, at landsstýrismaðurin tilætla ella av grovum ósketni hevur skúgvað sínar skyldur til viks, sum er treytin fyri, at hann kann revsast sambært lógini um ábyrgd landsstýrismanna.

Í míni frágreiðing um tær faktisku umstøðurnar í málinum havi eg víst á, at tað ikki er upplýst, um ella nær landsstýrismaðurin er kunnaður um innihaldið í einum innanhýsis arbeiðsskjalið, dagfest 29. apríl 2024, "*Viðvíkjandi ætlanum um at útluta ein part av heildarkvotuni av svartkjafti í 2024 sum felagskvotu*".

Tað er greitt, at hetta innanhýsis arbeiðsskjalið er dagfest eftir at kunngerðin er lýst. At yvirskriftin vísir til ætlanir og ikki eina framda útlutan at felagskvotu, kann tó geva ábending um, at skjalið kann vera framleitt, áðrenn kunngerðin er lýst.

Í uppritinum verður m.a. ført fram, at "*Heimildin at skipa fiskiskapin er breið, og mett verður, at ein broyting í býtinum av svartkjaftinum í 2024 er innan fyri heimildina*", og grundgivið verður eisini nærri fyri hesum.

Hevur landsstýrismaðurin havt kunnleika til innihaldið í hesum uppritinum, og hann bert hevur fylgt tí ráðgeving, sum umsitingin í fiskimálaráðnum hevur givið honum - tá hann setti í gildi kunngerð nr. 26 frá 24. apríl 2024 - so er ivasamt um ein manglandi lógarheimild fyri kunngerðini hevur við sær, at hann hervið "*tilætlað ella av grovum ósketni skúgvar til viks tær skyldur, sum liggja á honum sambært løgtingslóg um stýrisskipan Føroya ella lóggávuni annars ella starvsinnihaldi hansara*".

Út frá fyriliggjandi tilfari ber tó ikki til at staðfesta, hvørja vitan landsstýrismaðurin hevði og harvið koma nærri eini ítøkiligari niðurstøðu um ábyrgdina hjá landsstýrismanninum, í sambandi við at hann hevur sett í gildi kunngerð nr. 26 frá 24. apríl 2024.

Í míni frágreiðing um tær faktisku umstøðurnar í málinum havi eg eisini víst á, at frágreiðingin hjá landsstýrismanninum - samsvarandi § 7, stk. 4 í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi - um fyrisiting av sjófeingi og teimum veiðirættindum, Føroyar hava uttan fyri føroyskan sjógv, og hvørjar ætlanir hann hevur í hyggju at fremja - sum er løgd fram fyri Løgtingið sambært § 51, stk. 4 í Tingskipan Løgtingsins tann 11. apríl 2024, og har aðalorðaskifti var tann 18. apríl 2024 - ikki nevnir, at landsstýrismaðurin hevur ætlanir um, at ein partur av føroysku svartkjaftakvotuni í 2024 skal latast skipum sum felagskvota við hámarki.

Hinvegin verður nevnt, at "*samgongan hevur sett sær fyri, at aktørarnir í uppsjóvarvinnuni skulu javnsetast, tá føroysku kvoturnar lækka ella hækka*", og at "*tí er farið undir at fyrireika lógarbroytingar, soleiðis at allir rættindahavarar í uppsjóvarvinnuni eru javnsettir og undir somu treytum í lógini.*"

§ 5, stk. 2 í lógini um ábyrgd landsstýrisins, tilskilar, at: "*Ásetanin í stk. 1 er eisini galdandi, um so er, at løgmaður ella landsstýrismaður gevur løgtinginum skeivar ella villleiðandi upplýsingar, ella um hann, tá løgtingið viðger eitt mál, tigur við upplýsingum, sum eru av stórum týdningi fyri tingsins meting av málinum.*"

Við tað at kæran bert snýr seg um heimildina fyri kunngerð nr. 26 frá 24. apríl 2024, er hesin spurningur tó ikki viðgjørdur nærri.

Tórshavn, tann 20. desember 2024

Kristina Samuelsen, adv.